# GERĐABÓK

**Dato:** 25. januar 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIĐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen (luttók í viðgerðini av málunum 1/24 – 14/24 og 18/24)
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Jón Kragesteen
Birita Baldvinsdóttir Iversen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1/24 | 24/00247-2 | Bjørg Dam berst frá at møta á býráðsfundi 25. januar 2024 | 3 |
| 2/24 | 24/00445-2 | Turið Horn berst frá at møta á býráðsfundi 25. januar 2024 | 4 |
| 3/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 5 |
| 4/24 | 23/05755-2 | Umsókn um keyp av lendi. Matr.nr. 1292h og part av matr.nr. 1292d. | 6 |
| 5/24 | 23/04828-6 | Óbygt grundstykki. Matr.nr. 91y, Bøgøta 32, Kollafjørður. | 9 |
| 6/24 | 23/07341-2 | Víðarisøla matr.nr. 138co, Hoyvík. ( Myllutjørn ) | 11 |
| 7/24 | 23/07345-5 | Leigusáttmáli. Havnar Bóltfelag. Endurnýggjan av leigusáttmála hjá Havnar Bóltfelag, uppá undirlendið undir HB-húsinum. | 13 |
| 8/24 | 23/07070-5 | Leigumál gomlu lýsihúsini á matr.nr. 672c, Tórshavn. Leigarar. Føroyskir Radioamatørar. | 16 |
| 9/24 | 23/00181-1 | Yvirlit vinnulívið í Tórshavnar kommunu | 18 |
| 10/24 | 23/01374-2 | Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands 2023 | 22 |
| 11/24 | 23/03547-1 | Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði | 24 |
| 12/24 | 17/02942-1 | Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 29 |
| 13/24 | 23/03516-2 | Útstykking á Signabø | 46 |
| 14/24 | 21/02624-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging | 50 |
| 15/24 | 23/02421-1 | Framtíðar byggilendi í Kollafirði | 57 |
| 16/24 | 23/06318-2 | Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1 og øki 5.2 | 62 |
| 17/24 | 22/00329-1 | Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a | 67 |
| 18/24 | 20/03903-8 | Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum | 74 |
| 19/24 | 23/07386-1 | Endurskoðan av vegamótinum Løgmannabreyt / Vegurin Langi | 77 |

**Til viðgerðar**

## 1/24 Bjørg Dam berst frá at møta á býráðsfundi 25. januar 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 1/24 | 24/00247-2 |

**Málslýsing:**
Bjørg Dam hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 2/24 Turið Horn berst frá at møta á býráðsfundi 25. januar 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 2/24 | 24/00445-2 |

**Málslýsing**
Turið Horn hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Tikið til eftirtektar.

| | Blað nr.: 5 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. januar 2024 | Formansins merki: |

# 3/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

# 4/24 Umsókn um keyp av lendi. Matr.nr. 1292h og part av matr.nr. 1292d.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 37/24 | 23/05755-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.02.2024 | 10/24 | 23/05755-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.01.2024 | 8/24 | 23/05755-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 23/05755-2 |
| 5 Tekniska nevnd | | | 23/05755-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 4/24 | 23/05755-2 |

**Upprunin til málið.** Leks advokatfirma, hevur hin 29. september 2023, sent kommununi eina umsókn vegna P/F Effo, um møgulig keyp av lendi.

**Lýsing av málinum.**

P/F Effo, søkir um at keypa. matr.nr. 1292h, ( vídd 1.329 m² ) og uml. 700 m² av matr.nr. 1292d.

Ætlanin er at leggja hesar uml. 2.029 m² afturat teirra verandi grundstykki matr.nr. 1291, sum er til víddar 1.500m². og verður samlaða víddin hereftir uml. 3.529 m²

Verandi Effostøð liggur á matr.nr. 1291. Felagið leigar harumframt matr.nr. 1292d, sum er til víddar 1.329m². Bilvaskihøllin sum er sambygd við verandi Effostøð, stendur á hesum matriklinum. og er hesin partur av matriklinum eisini asfalteraður.
Tangar og annar útbúnaður liggur niðurgrivin í lendinum.

Effo umhugsar at byggja eina nýggja støð í Gundadali, sum kann rúma handli/olju og bensin, el-løðing, bilvask, umframt høvuðsskrivstovu, og verður skrivstovan sum í dag er á Óðinshædd ætlandi flutt oman í Gundadal.

Verandi bygningur verður tikin niður. Zeta arkitektar hava gjørt eitt uppskot, har bygt verður í 2. Hæddum.

Leigusáttmálin viðvíkjandi matr.nr. 1292d, er undirskrivaður 08.05.1995.

**Sambært grein 2. Í sáttmála.**

Leigumálið kann av báðum pørtum verða uppsagt við einum ára fyrivarningi til ein 1. Januar. Leigumálið kann av Tórshavnar býráð ikki verða sagt upp fyrr enn til 1. Januar 2020, uttan so at leigarin annars ger brot á leigusáttmálan.

Leigarin pliktar seg til at taka alt burtur sum er á stykkinum, tá leigumálið er úti ella verður uppsagt. Verður hetta ikki gjørt, kann býráðið gera tað fyri leigarans rokning.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023

§ 44. Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment.

Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn

22. december 2000Nr. 122

Søla av lendi til umsøkjara, lýkur ikki krøvini í teimum undantøkum frá høvuðsregluni um, at fastogn skal verða boðin út alment, áðrenn hon verður seld.

Neyðugt verður tí at søkja um loyvi til søluna frá Landstýrismanninum.

Søla av lendi skal verða til marknaðarprís. Biðið verður um virðismeting frá tveimum óvildigum virðismetarum.

Víst verður til notat í málinum. **Skjal 23/05755-5**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**

- Umsókn um keyp av lendi,
- lýsing av grundøkinum,
- verandi leigusáttmáli,
- Effo-forkanningar av nýggjum høvuðssæti í Gundadali,
- Notat-Viðmerkingar til sølu av kommunalari ogn uttan útboð.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni, mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Tikið av skrá.

# 5/24 Óbygt grundstykki. Matr.nr. 91y, Bøgøta 32, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2024 | 6/24 | 23/04828-6 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 5/24 | 23/04828-6 |

**Upprunin til málið.** Eigarar heita á kommununa um at keypa grundstykkið aftur.

**Lýsing av málinum.**

**Matr.nr. 91y, Bøgøta 32, Kollafjørður.**

Skeytið tinglýst 19.02.2019. Byggifreist. 19.02.2022.
Víddin á stykkinum er 535 m²
Prísur kr. 251.455,35

Stykkið liggur óbygt og hevur Kommunan rykt uppá byggifreist.
Eigarar heita nú á kommununa um at keypa stykkið aftur.

Sambært skeytisásetingum, skal verandi eigari rinda fyri tinglýsing av afturkeyps skeytinum, og verður kommunan hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 251.455,35 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri uppruna sølupris kr. 251.455,35

Tá ið kommunan er vorðin tinglýstur eigari av stykkinum, verður stykkið útlutað sambært reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús, samtykt á býráðsfundi 24. februar 2022.

Verandi eigari rindar fyri tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

## 6/24 Víðarisøla matr.nr. 138co, Hoyvík. ( Myllutjørn )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2024 | 7/24 | 23/07341-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 6/24 | 23/07341-2 |

**Upprunin til málið** Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum.**
Eigari av óbygdum grundstykki matr.nr. 138co, søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum.

Bjørnin Sp/f keypti grundstykkið fríðari sølu í 2022.
Verandi skeyti er tinglýst 01.06.2022. Keypsprísur 1,1 mill. kr.
Søluupphæddin í víðarisøluskeytinum verður 1,1 mill. kr. og vísir til verandi tinglýstar serviuttir.

Kommunan hevur hin 09.09.2022 útskrivað byggiloyvi til bygging av sethúsum á grundstykkinum, og hava keyparar ætlanir um at byggja hús samsvarandi útskrivaðum byggiloyvi.

Upplýsast kann, at grundstykkið hevur skift eigara nakrar ferðir, og hava higartil verið 4 ymiskir tinglýstir eigarar av grundstykkinum.

Kommunan tók óbygda grundstykkið innaftur í 2018. Síðani varð grundstykkið selt aftur í fríðari sølu í 2019. Keyparar sleptu tó ætlanunum um at byggja á stykkinum, og gav kommunan tá loyvi til at táverandi keyparar/eigararar kundu selja grundstykkið í fríðari sølu, vísandi til at tey høvdu keypt stykkið í fríðari sølu.
Siðani seldu táverandi eigarar stykkið í fríðari sølu til núverandi eigarar.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstir servituttir í upprunaskeytinum í 2011, og nýggir servituttir um bygging/afturkeyp sum eru tinglýstir í 2019.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl-**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at loyva víðarisølu av grundstykkinum matr.nr. 135co, Hoyvík, fyri 1,1 mill. kr.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

# 7/24 Leigusáttmáli. Havnar Bóltfelag. Endurnýggjan av leigusáttmála hjá Havnar Bóltfelag, uppá undirlendið undir HB-húsinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 18/24 | 23/07345-5 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 7/24 | 23/07345-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | | | 23/07345-5 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá Havnar Bóltfelag.

**Lýsing av málinum.**

Havnar Bóltfelag søkir um, at verandi leigusáttmáli verður longdur og áteknaður um, at loyvt er at framleiga ella avhenda alt tað leigaða økið til sama endamál.

Havnar Bóltfelag selur HB-húsið til eitt ognarfelag, ið privatir HB-stuðlar seta á stovn. Hesir seta 12 mió. kr. í nýggja ognarfelagið, harav 5 mió. kr. eru lántøka.

Endamálið við søluni er at tryggja Havnar Bóltfelag pening til at rinda aftur skuld og til at tryggja felagnum nøktandi fíggjarligan rakstur komandi árini.

Nýggi eigarin yvirtekur bygningin við somu rættindum og skyldum, sum undanfarni eigari hevði mótvegis Tórshavnar kommunu sum útleigara av undirlendinum undir húsinum.

Ein leigusáttmáli verður gjørdur millum nýggja ognarfelagið Sp/F 0410 og Havnar Bóltfelag um HB-húsið.

Árliga leigan er teirra millum avtalað til kr. 540.000,00, ið svarar til útreiðslurnar, ið smápartafelagið hevur av rentum og útreiðslum av lántøkuni til at keypa felagshúsið.

Leigarin rindar allar viðlíkahalds útreiðslur av húsinum umframt el og hita. Vanliga er tað eigarans ábyrgd at viðlíkahalda uttan, og tískil er ikki talan um heilt vanligar karmar millum leigara og útleigara. Ásetingin er helst ætlað at tryggja, at HB kann søkja kommununa um stuðul til viðlíkahald av HB-húsinum, tí tað er ikki loyvt einari kommunu at veita einum privatum partafelag stuðul til slíkar viðlíkahaldsútreiðslur.

Ásett er í søluskeytinum millum HB og ognarfelagið, at HB til eina og hvørja tíð hevur rætt til at keypa ognina aftur fyri 12 mill. kr.

**Verandi leigusáttmáli:**

Leigusáttmáli fyriliggur millum Tórshavnar kommunu sum útleigara og Havnar Bóltfelag sum leigara. Leigumálið umfatar undirlendið undir HB-húsunum, sum eru staðsett á part av matr.nr. 1268a, Tórshavn.

Sáttmálin er dagfestur 20. februar 1992, og kann ikki verða uppsagdur av Tórshavnar kommunu fyrrenn til 1. februar 2020, uttan so at leigarin í aðrar mátar ikki hevur hildið sáttmálan.

So leingi sum annar parturin ikki sigur leigumálið upp, er leigusáttmálin galdandi.

**Lógir, ásetingar o.a. Byggisamtykt.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Leigusáttmálin millum Tórshavnar kommunu og Havnar Bóltfelag verður longdur, soleiðis, at hann er galdandi óuppsigiligur frá kommununar síðu til 01.01.2034.

Eitt ískoyti verður gjørt til verandi leigusáttmála, ið ásetur, at bæði leigari og útleigari eftir hetta kunnu siga upp leigumálið við eitt ára freist.

Harumframt verður ásett í ískoytinum, at leigumálið við býráðsins góðkenning kann framleigast einstaklingi ella felagi. Henda áseting er neyðug, skal nýggja smápartafelagið kunna innganga í leigumálið við Tórshavnar kommunu.

Ætlanin hjá HB at selja felagshúsini til privat ognarfelag er ikki roynd áður. Onnur feløg, ið eiga hús í ítróttarøkinum í Gundadali, eru B36, Dansifrøi og FSF. Í hvørgum av førunum er talan um privat felag, og tí verður hetta fyrstu ferð, at eitt ítróttarfelag selir ogn sína til privatar íleggjarar fyri síðani at leiga hesa somu ogn aftur frá privata ognarfelagnum.

Á henda hátt kemur ein eigari inn í Gundadal, sum kommunan ikki hevur somu møguleikar til at veita stuðul og sømdir annars.

Ein annar møguleiki enn tann, ið HB nú søkir kommununa um, er at kommunan yvirtekur felagshúsini í Gundadali og leigar hesi út aftur til feløgini at brúka.

Fleiri dømi eru í Føroyum um, at kommunur eiga og leiga/geva nýtslurætt til felagshús við fótbóltsvøllir. So er eisini Inni í Vika á Argjum, tá um ræður felagshølini í skýlinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Leigusáttmáli 1992 + kortskjal. Ískoyti til leigusáttmála. Leigusáttmáli millum ognarfelagið og HB. Frásøgn frá eykaaðalfundi hjá HB.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at gera ískoyti til verandi leigusáttmála um at leingja sáttmálan til 01.01.2034 og at loyva verandi leigara at framleiga leigumálið undir HB-húsinum til Sp/f 0410, sí skjal j.nr. 23/07345-18.

Sáttmálin verður annars óbroyttur í øllum orðum og setningum tess, og er treytaður av at nýggi eigarin yvirtekur bygningin við somu rættindum og skyldum, sum undanfarni eigari hevði mótvegis Tórshavnar kommunu sum útleigara av undirlendinum undir húsinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Málið útsett.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Tikið av skrá.

# 8/24 Leigumál gomlu lýsihúsini á matr.nr. 672c, Tórshavn. Leigarar. Føroyskir Radioamatørar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 21/24 | 23/07070-5 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 8/24 | 23/07070-5 |

**Upprunin til málið.** Radioamatørarnir søkja um at leigumálið verður longt.

**Lýsing av málinum.**

**Verandi leigusáttmáli er undirskrivaður 01.10.1980.**

Leigari søkir um at

- Verandi áseting dettur burtur. Leigumálið byrjar við undirritan av hesum leigusáttmála og stendur við í 49 ár. ( T.v.s. til 01.10.2029 )
- Nýggj orðing í leigu málið í staðin. Leigumálið verður longt óuppsigiligt frá kommununar síðu til 01.10.2039.
- Eigarin átekur sær alt uttandura viðlíkahald, meðan leigarin hevur alt innandura viðlíkahald. ( Henda áseting verður óbroytt galdandi ) Afturat hesum hevur leigarin viðlíkahald av vindeygum. Henda áseting dettur burtur, og verður tikin úr verandi leigusáttmála.
- Leigusáttmálin verður annars óbroyttur galdandi í øllum orðum og setningum tess.

**Upprunin til leigusáttmálan.**
Verandi leigusáttmálið stavar frá, at kommunan fyrst í áttatiárunum, fór undir eina sethúsa ústykking á Ternuryggi, og var tá neyðugt, at kommunan ognaði sær matrikkul nr. 1470o, við ástandandi húsum frá Føroyskum Radioamatørum.

Aftur fyri, at kommunan fekk matrikkulin til ognar, og tískil kundi fremja sethúsaútstykkingina á økinum, fingu Føroyskir Radioamatørar verandi langtíðarleigusáttmála, í húsunum yviri við Strond.

**Áseting í sáttmála um leigutíðarskeið.**
Leigumálið byrjar við undirritan av hesum leigusáttmála og stendur við í 49 ár. Tá hesi 49 ár eru liðin, skulu samráðingar fara fram um framhald av leigumálinum um so er, at leigarin ynskir hetta.

Heldur leigumálið fram, aftaná at 49 ár eru farin, uttan at avtala  er gjørd um framleingjan, skal tað standa við til tað verður uppsagt av øðrum partinum við 5 ára freist.

**Um viðlíkahald.**
Eigarin átekur sær alt uttanveggja viðlíkahald, meðan leigarin hevur alt innandura viðlíkahald. Afturat hesum hevur leigarin viðlíkahald av vindeygum.

Sambært húsaumsitingini hjá kommununi, er møguligt skift av vindeygum ábyrgd eigarans. T.v.s. at um kommunan skiftir vindeyguni út, rindar kommunan allan kostnaðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at samtykkja uppskot til ískoyti til verandi leigumál.

- Verandi áseting dettur burtur. Leigumálið byrjar við undirritan av hesum leigusáttmála og stendur við í 49 ár. ( T.v.s. til 01.10.2029 )
- Nýggj orðing í leigu málið í staðin. Leigumálið verður longt óuppsigiligt frá kommununar síðu til 01.10.2039.
- Eigarin átekur sær alt uttandura viðlíkahald, meðan leigarin hevur alt innandura viðlíkahald. ( Henda áseting verður óbroytt galdandi ) Afturat hesum hevur leigarin viðlíkahald av vindeygum. Henda áseting dettur burtur, og verður tikin úr verandi leigusáttmála.
- Leigusáttmálin verður annars óbroyttur galdandi í øllum orðum og setningum tess.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

# 9/24 Yvirlit vinnulívið í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 12.01.2023 | 2/23 | 23/00181-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 20/23 | 23/00181-1 |
| 3 Vinnunevndin | 11.05.2023 | 14/23 | 23/00181-1 |
| 4 Vinnunevndin | 30.11.2023 | 29/23 | 23/00181-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2023 | 349/23 | 23/00181-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 15/24 | 23/00181-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 08.01.2024 | 2/24 | 23/00181-1 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.01.2024 | 6/24 | 23/00181-1 |
| 9 Havnanevndin | 09.01.2024 | 3/24 | 23/00181-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 10.01.2024 | 17/24 | 23/00181-1 |
| 11 Trivnaðarnevndin | 11.01.2024 | 3/24 | 23/00181-1 |
| 12 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 9/24 | 23/00181-1 |

**Upprunin til málið**

Høvuðsstaðurin er ein kommuna í vøkstri og arbeitt verður stig- og miðvíst við at menna býin og bygdirnar soleiðis, at fólk trívast og støðast í allari kommununi.

Seinnu árini hevur kommunan sett fokus á ferðavinnuna og ferðavinnupolitikk, tí mett verður, at ferðavinnan er eitt av týðandi amboðunum at skapa góð samfeløg við trivnaði,
vøkstri og menning.

Sjóneykan skal nú setast á vinnulívið í høvuðsstaðnum sum heild.

Tíðin er búgvin til, at ein vinnupolitikkur verður orðaður soleiðis, at býráðið, umsitingin og vinnulívið hava felags mál at arbeiða fram ímóti og eina ætlan fyri, hvussu málini verða rokkin.

Tí verður farið undir at orða ein vinnupolitikk í Tórshavnar kommunu í 2023.

Tað er ikki uppgávan hjá kommununi at reka vinnulív.

Tað ger privata vinnan.

Uppgávan hjá kommununi er heldur at skapa hóskandi karmar soleiðis, at vinnan og vinnuliga virksemið kunnu virka, mennast og vaksa.

Tørvur er at arbeiða meira skipað og miðvíst við hesum málum og vinnulívsøkinum sum heild.

Umboð fyri vinnuna vísa við jøvnum millumbili á, at vinnan hevur tørv á betri kørmum at virka undir, at tað er ov trupult og fløkt at samskifta við kommununa, og at kommunan sum heild tykist ov langt burtur frá vinnulívinum.

Politiski viljin er, at tað áhaldandi skal arbeiðast við at skapa góðar og fjølbroyttar karmar fyri vinnulívið og áhaldandi vinnulívsmenning í høvuðsstaðarkommununi.

Mett verður, at ein vinnupolitikkur eigur at verða orðaður, sum hevur til endamáls at skapa hóskandi karmar fyri vinnulívið og vinnulívsmenning í Tórshavnar kommunu.

Politikkurin er eitt gott amboð at arbeiða eftir, og tilgongdin við at orða politikkin kann eisini viðvirka til spírandi og gevandi samskifti og samstarv millum politisku skipanina, umsitingina og vinnuna í kommununi.

Royndirnar frá arbeiðinum við ferðavinnupolitikkinum vísa, at ferðavinnupolitikkurin hjá kommununi hevur verið eitt gott og neyðugt amboð hjá øllum, sum arbeiða við ferðavinnu. Flestu tilmælini úr undanfarna politikki eru sett í verk, og í sambandi við, at nýggjur politikkur varð orðaður, varð nógv tíð og orka løgd í at taka borgarar og ferðavinnuna við uppá ráð.

Samanumtikið verður mett, at arbeiðið við vinnupolitikki eigur at verða skipað eftir sama leisti sum ferðavinnupolitikkurin.

Partur av arbeiðinum við at orða vinnupolitikk er at fáa yvirlit yvir vinnulívið í Tórshavnar kommunu, og at fáa til vega neyðug hagtøl, sum lýsa vinnulívið, og hvønn týdning vinnulívið hevur fyri búskapin í kommununi og landsbúskapin.

Eisini eigur at verða hugt eftir, hvønn leiklut kommunan hevur í vinnulívinum í høvuðsstaðnum.

Næsta stig er at gera tilmæli um átøk, sum skulu skapa hóskandi karmar fyri vinnulívið og vinnulívsmenning í kommununi.

Arbeiðið verður skipað við einum arbeiðssetningi, arbeiðsbólki við umboðum fyri avvarðandi partar, og er ætlanin at seta eitt verkætlanarfólk at standa fyri arbeiðinum.

Arbeiðsbólkurin skal lýsa vinnulívið í Tórshavnar kommunu, og fáa til vega neyðug hagtøl, sum lýsa vinnulívið og hvønn týdning vinnulívið hevur fyri búskapin í kommununi og landsbúskapin.

Eisini skal arbeiðsbólkurin lýsa verandi mannagongdir, sum eru innanhýsis í kommununi í sambandi við málsviðgerð og samskifti sum heild millum vinnu og umsiting.
Lýsingin skal somuleiðis fevna um verandi leiklut hjá Tórshavnar kommunu í mun til vinnulívið og vinnulívsmenning.

Arbeiðsbólkurin skal eisini gera uppskot til vinnupolitikk og átøk.

• Uppskotið til vinnupolitikk skal leggja dent á, hvussu kommunan best
kann skapa karmar fyri, at vinnulívið kann virka, mennast og vaksa
• Uppskotið skal gera greitt, hvør er uppgávan hjá ávikavist kommununi og
vinnuni í strembanini eftir at skapa eitt fjølbroytt og burðardygt vinnulív í høvuðsstaðnum.
• Lýsingin og tilmælini skulu vera grundað á viðkomandi hagtøl, kanningar og frágreiðingar. Gjøgnum samskifti við vinnulív, handilsfeløg, áhugabólkar og onnur skal arbeiðsbólkurin tryggja, at sjónarmiðini hjá ymsu pørtunum verða viðgjørd í arbeiðinum at orða vinnupolitikkin.

Uppgávan er eisini at koma við eini tíðarætlan fyri íverksetan av tilmælunum, meting av ábyrgdarbýtinum og kostnaðarmeting av átøkunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Arbeiðið at orða vinnupolitikk hevur útreiðslur við sær fyri kommununa.

Samanlagt verður mett, at arbeiðið kostar 500.000 kr., til verkætlanarfólk, arbeiðsbólk, prent og hagtøl frá Hagstovu Føroya.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla vinnunevndini til at taka undir við tilmælinum um at fara undir arbeiðið at orða ein vinnupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

**Vinnunevndin 12. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Beinta Løwe kemur inn at greiða frá vinnupolitikkinum.

**Vinnunevndin 11. mai 2023:** Beinta Løwe kunnaði um vinnupolitikkin.

**Ískoyti:**
Beinta Løve kemur at greiða frá vinnupolitikkinum.

**Vinnunevndin 30. november 2023:** Samtykt at taka undir við framlagda vinnupolitikkinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2023:** Samtykt at taka undir við vinnupolitikkinum og beina málið í býráðið umvegis viðkomandi nevndir til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 08. januar 2024:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. januar 2024:** Kunnað varð um málið.

**Havnanevndin 09. januar 2024:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 10. januar 2024:** Tikið av skrá.

**Trivnaðarnevndin 11. januar 2024:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

# 10/24 Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 63/23 | 23/01374-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 10/24 | 23/01374-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Lýsing av málinum – samandráttur Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017, verður nevndin í P/F Visit Faroe Islands mannað við 7 nevndarlimum, harav Tórshavnar Kommuna tilnevnir 1 umboð.

Lutfalsval.

§ 3. Nevndin skal vera mannað við 7 limum. Limirnir skulu umboða Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar og mentanina/ítróttin. Stk. 2. Nevndin skal vera sett saman av lyklapersónum innan ymsu økini, og nevndin skal samlað hava teir fakligu førleikar, sum skulu til fyri at røkka endamálinum í § 2. Stk. 3. Aðalfundurin velur nevndarformannin. Aðalfundurin velur hinar nevndarlimirnar soleiðis:
1) Eitt umboð fyri Ferðavinnufelagið, umboðandi ferðavinnuna í Føroyum, herundir gistingarhús, matstovuvinnu, ferðasmiðir v.m.
2) Tvey umboð fyri ferðaflutningsfyritøkur
3) Eitt umboð frá Tórshavnar Kommunu
4) Eitt umboð fyri kommunurnar uttan fyri Tórshavnar kommunu
5) Eitt umboð fyri mentanina ella ítróttin
6) Eitt umboð fyri landsstýrismannin
Stk. 4. Áðrenn nevndin setur stjóra, skal landsstýrismaðurin verða kunnaður.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin góðkennir starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og lønina til stjórn felagsins.

Í viðmerkingunum til § 3 í lógini er í lógaruppskotinum ásett, at *“nevndin skal vera eitt avgerðarforum, sum stingur út í kortið fyri føroyska ferðavinnu. Tað er týdningarmikið, at tað eru professionell lyklaumboð (t.d. stjórar) innan ymsu økini, sum vegna felag ella myndugleika í størst møguligan mun hava avgerðarheimildir.”*

Víðari verður tað nevnt í serligu viðmerkingunum, at *“Tórshavnar Kommuna tilnevnir eitt umboð fyri kommununa, sum umboðar leiðslu ella annan lyklapersón í kommununi, og sum hevur kunnleika til ferðavinnuna í høvuðsstaðnum.”*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt at velja Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóra, í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Ískoyti:**
Bjørgfríð Ludvig er farin úr starvi hjá Tórshavnar Kommunu og fer eisini úr nevndini hjá Visit Faroe Islands. Tískil skal nýtt umboð úr Tórshavnar Kommunu veljast til nevndina hjá Visit Faroe Islands

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt at velja Jóan Petur Hentze, kommunustjóra, í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

# 11/24 Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 19/23 | 23/03547-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 191/23 | 23/03547-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 147/23 | 23/03547-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 186/23 | 23/03547-1 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 28.11.2023 | 29/23 | 23/03547-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.12.2023 | 338/23 | 23/03547-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.12.2023 | 361/23 | 23/03547-1 |
| 8 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 325/23 | 23/03547-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 11/24 | 23/03547-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Lágargarður sum var sjálvsognarstovnur til kommunan yvirtók eldraøki í 2015 er 36 ára gamal. Lágargarður treingir til at umvælast og nakað er gjørt seinnu árini. Serliga køkurin treingir til eina høvuðsumvæling um hann framhaldandi skal kunna virka. Nakað av útbúnaðinum í køkinum er skift út seinnu árini, tí útbúnaðurin antin gekk fyri ella var í so ringum standi at trupult var at brúka hann.

Køkurin á Lágargarði ger umframt allan mat til teir 48 borgararnar sum búgva har, eisini mat til búfólkini á Tjarnargarði í eru 41 í tali.

Eisini ger køkurin døgurða til teir áleið 30 borgararnar sum dagliga koma í virkis- og venjingarstovuna á Lágargarði umframt at matartænastan er staðsett í køkinum á Lágargarði. Tað verða í køkinum á Lágargarði gjørdir døgurðar til áleið 110 heimabúgvandi borgarar, sum svarar til áleið 460 døgurða og 421 dessertir um vikuna til heimabúgvandi borgarar.

Tað er ikki longur gjørligt at økja um kapasitetin í køkinum. Sannlíkt er at matartænastan bara økist, sum tað gerast fleiri og fleiri eldri borgarar. Ætlanin er tí, at tá nýggja røktarheimi á Stórubrekku sum arbeitt verður við í løtuni er liðugt, verður matartænastan flutt av Lágargarði til køkin á nýggja røktarheiminum. Sostatt er tað sum so, ikki tørvur á at útbyggja køkin á Lágargarði, men alneyðugt at høvuðsumvæla køkin, eisini so at hann lýkur tey krøv sum verða sett til stórkøkar av hesum slag.
Sí støðulýsing frá bygningsdeildini

Tað er alneyðugt at fari verður undir at høvuðsumvæla/nýbyggja køkin á Lágargarið sum skjótast, men fyrst má arbeiði projekterast so ein neyv ætlan og kostnaðarmeting fyriliggur, soleiðis at fígging kann fáast til vega og arbeiði bjóðast út.

Bygningsdeildin metir at projekteringsarbeiðið kostar áleið 700.000 kr. men hevur ikki pening tøkan til hetta arbeiðið. Heilsu- og umsorganartænastan hevði eina minninýtslu í 2022 og tí er møguligt sum eykajáttan at flyta 700.000 kr. av konto 2722 Tilboð til konto 6110 Umsiting og røkt av bygningum, soleiðis at peningur er tøkur til projekteringsarbeiðið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á bygningsdeildini og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla Heilsu- og eldranevndini til, sum eykajáttan at flyta 700.000 kr av 2722 -Tilboð á 6110 Umsiting og røkt av bygningum til projektering av høvuðsumvæling ella nýbygging av køkinum á Lágargarði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 21. juni 2023: Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekteringsarbeiði.
Sambært býráðssamtyktini, setti Bygningsdeildin prosjekteringsarbeiði í gongd. Útgangsstøðið er støðulýsingini (sum var løgd fyri nevndina hin 19 juni)

Projekteringsarbeiði er nú komi fram at lidnum prosjektuppskoti. Sostatt eru neyvari tekningar og tilhoyrandi kostnaðarmetingar tøk til kunning. Sí hjáløgdu skjøl um prosjektuppskot.

Prosjektuppskotið er gjørt av ráðgevarum innan HVS, EL, konstruktión, byggifrøði, arkitektur og prosjektleiðslu. Ráðførsla við brúkarar hevur verði við deildarleiðaran fyri køkarnar í H&U og køksleiðaran á Lágargarði. Harumframt hevur samráð verði við Heilsufrøðiligu starvstovuna um køksinnræting, reinførisreglur og mannagongdir (Flow)

Í mun til málslýsingina, ið var løgd fyri nevndina hin 19 juni, eru fortreytirnar broyttar soleiðis at matartænastan, ístaðin fyri at flyta í nýggja røktarheimið á Stórubrekku, framhaldandi skal verða partur av køkinum á Lágagarði.

Stutt um matartænastuna
Matartænasta byrjaði á Lágargarði í kreppuni í 1993, og kom við, tá kommunan yvirtók eldraøkið frá landinum. Talið av brúkarum og veitingum hevur verði rættuliga støðugt, seinastu fimm árini, og liggur í dag um 100 brúkarar sum fáa áleið 17 veitingar um mánaðin, te. Tilsamans áleið 1700 veitingar um mánaðin. Ein varislig 10- ára framrokning av tænastuni, vísir ein støðugan vøkstur til umleið 2700 veitingar í 2033

Høvuðsumvæling og umbygging
Í støðulýsingini var víst á tørvin, at flyta frystigoymsluna úr garasjuni og heldur gera frystirúm sum part av køkinum. Avbjóðingin gjørdist tí, at finna røttu staðsetingina í mun til flow og kapasitet. Reinførisreglurnar mæla frá at staðseta frystirúmið fyri endan av framleiðslu flowinum, sum støðulysingin annars legði upp til. Í prosjektuppskotium eru tí í staðin gjørd pakkihølir og nýggjur durur til matartænastuna fyri endan av framleiðslu flowinum (partur av matstovuni) sí tekningar í prosjektuppskotinum.

Neyðugt er eisini at gera nýggja ventilatiónsskipan. Prosjektuppskotið leggur upp til at gera nýtt tøknirúm omanfyri verandi ventilatiónsrúm. Hetta ger samstundis, at pláss verður fyri nýggjum frysti- og tini rúmi har ventilatiónsrúmi var. Við hesi loysnini verður betra munandi um flow og mannagongdir í mun til reinføri, eins og køli- og frystikapasitetur verður framtíðartryggjaður.

Fyri at fylgja reglum um arbeiðsumhvørvið leggur prosjektuppskotið upp til at gera nýggj wc- og skiftingarrúm, sum skulu verða burturav til starvsfólkini í køkinum.

Fyri at betra um arbeiðsgongdir verður uppvaskirúmið víðka munandi, so pláss eisini verður fyri at vaska vognar og onnur stór ting.

Við prosjekuppskotium verður køkurin umleið ein triðing størri, íroknað eyka hædd til tøknirúm. Víðkanin er 80 fermetrum úr núverandi 244 upp í 324 fermetrar. Kostnaðurin av prosjektuppskotinum verður tí eisini munandi hægri enn upprunaliga metingin. Sí skjal: *«kostnaðarmeting prosjekt uppskot»*

Saman við fyrisitingini í H&U hevur Bygningsdeildin fingið til vega eitt alternativt uppskot til innrætting, har víðkanin ikki er eins stór. Í hesum uppskotinum verður ventilatiónsrúmi ikki flutt og uppvaskirúmið

verður somu stødd sum verandi. Býtt verður um uppá staðseting av ávíkavist køli-, svali og frystirúm, og hesi rúm verða samstundis tilsamans minkað úr 45 fermetrum, niður í 26 fermetrar.

Hóast minni rúmshátt, verður framvegis hildið verður fast í meginreglunum um flow og reglur um reinføri og arbeiðsumhvørvi. Við hesum uppskotinum verður víðkanin umleið 40 fermetrar og kostnaðurin samsvarandi lægri   Sí skjal: *«kostnaðarmeting prosjekt uppskot 2»*

<u>Endurhýsing í skúlanum á Fløtum</u>
Í prosjekteringstilgongdini er uppskot frammi, um at flyta alt virksemi úr køkinum á Lágargarði í køkin í Skúlanum á Fløtum í byggitíðini. Køksstarvsfólkini hava kannað viðurskiftini, og niðurstøðan er, at hetta letur seg gera uttan stórvegis tillagingar. Tó má roknast við at einstøk flytbar tól mugu takast við úr Lágargarði ella leigast. Í byggitíðini skal maturin sostatt koyrast av skúlanum til bæði Tjarnargarð og Lágargarð, umframt at  matartænastan skal virka sum nú.

Skúlaleiðslan á Skúlanum á Fløtum, er kunnað um ætlanina at brúka køkin. Hetta skal tó endaliga staðfestast í samráð við Mentamáladeildina. Í kostnaðarmetingini, sum er partur av prosjektuppskotinum, er hædd tikin fyri kostnaðinum av endurhýsing.

Sí fylgiskjal við kostnaðarmeting.

<u>Fígging</u>

Fíggjartørvurin í 2024, kann játtast sum eykajáttan millum rakstur og íløgur av væntaðari minninýtslu í 2023 á deildunum 2721 Røktartænastur og 2722 Tilboð.
Av teimum fyrr játtaðu 700.000 kr. til projekteringsarbeiði eru 236.000 kr. brúktar íroknað netto mvg.
Mælt verður til at restupphæddin á 464.000 kr somuleiðis verður flutt á verkætlanina.

Játtast av:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2721 | Røktartænastur | 2.700.000 kr. | (2721 - 741012) |
| 2722 | Tilboð | 1.300.000 kr. | (2722 - 741012) |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 464.000 kr. | (6110 - 61112 - 741012) |
| | Í alt | 4.464.000 kr. | |

Játtast á:
2775 Eldrarøkt (íløgur)
Nýggj verkætlan: 2775 - L270xx (Lágargarður, høvuðsumvæling køkur)

Fíggjartørvurin í 2025 má játtast, sum partur av íløguætlanini fyri 2025.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 2721<br>2722<br>6110 | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 2775 | | Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði | L270xx |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 16.364.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 / 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til, sum eykajáttan í 2024, at flyta kr. 4.464.000 til nýggja verkætlan nevnd; "Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði", og geva heimild til at niðurríva verandi køk, og bjóða verkætlanina út á sumri í 2024. Komið verður aftur í nevndina, í sambandi við fíggjartørvin í 2025.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 28. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2023:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 12/24 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.09.2017 | 16/17 | 17/02942-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 196/17 | 17/02942-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 206/17 | 17/02942-1 |
| 4 Eldranevndin | 15.01.2018 | 39/18 | 17/02942-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 11/18 | 17/02942-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 15/18 | 17/02942-1 |
| 7 Eldranevndin | 21.08.2018 | 7/18 | 17/02942-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 231/18 | 17/02942-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 187/18 | 17/02942-1 |
| 10 Eldranevndin | 09.10.2018 | 14/18 | 17/02942-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 290/18 | 17/02942-1 |
| 12 Eldranevndin | 26.11.2018 | 17/18 | 17/02942-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 331/18 | 17/02942-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 269/18 | 17/02942-1 |
| 15 Eldranevndin | 15.06.2020 | 4/20 | 17/02942-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 165/20 | 17/02942-1 |
| 17 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 139/20 | 17/02942-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 195/20 | 17/02942-1 |
| 19 Eldranevndin | 08.07.2020 | 11/20 | 17/02942-1 |
| 20 Býráðsfundur | 08.07.2020 | 163/20 | 17/02942-1 |
| 21 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 165/20 | 17/02942-1 |
| 22 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 46/21 | 17/02942-1 |
| 23 Heilsu- og eldranevndin | 09.03.2021 | 9/21 | 17/02942-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 50/21 | 17/02942-1 |
| 25 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 73/21 | 17/02942-1 |
| 26 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 113/21 | 17/02942-1 |
| 27 Heilsu- og eldranevndin | 09.05.2023 | 11/23 | 17/02942-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 136/23 | 17/02942-1 |
| 29 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 122/23 | 17/02942-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 165/23 | 17/02942-1 |
| 31 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 224/23 | 17/02942-1 |
| 32 Fíggjarnevndin | 17.01.2024 | 2/24 | 17/02942-1 |
| 33 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 12/24 | 17/02942-1 |

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

Demensdepil
Í løtuni eru 10 búpláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa tilboð sum er nøktar teirra tørvi á einum stað. Tað vil siga at ein borgari kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl lættari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í  og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

Tilgongd víðari
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18

- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017**: Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið um ráðgevarasáttmála um prosjektering. Samlaður kostnaður fyri prosjekteringsleiðslu, prosjektering, byggileiðslu og fakeftirlit er kr. 3.100.000.

Á løgukontuni L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði, eru tøkar kr. 1 mió. Játtast kunnu 2,1 mió av tøka løguarminum 2775 Eldrarøkt L00001.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at játta kr. 2,1 mió av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði.

**Eldranevndin 15. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í samband við umbygging av Tjarnargarði eru komin fram viðurskifti sum gera at kostnaðarmetingin hækkar.

Stórt ynski hevur í nógv ár verið um at byggja báðar bygningarnar saman við einum glasmillumbygningi. Við at binda bygningarnar saman kann fáast meira skynsamur rakstur tí til ber hjá starvsfólkinum at ganga inni tí bygningurin er sum ein. Mett verður at glas millumbygningur kostar 315.500 kr. at gera.

Búfólkini á Tjarnargarði fáa mat av Lágargarði, av tí at køksviðurskiftini á Tjarnargarði ikki loyva at matur í stórum mongdum verður gjørdur á staðnum. Hetta passar illa við hugburðin um at røktarheimini í Tórshavnar kommunu skulu vera heimlig. Køkur skal gerast á Tjarnargarði í samband við umbyggingina, tó er bert hugsa at køkurin skal virka á sama hátt sum higartil. Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at gera køkin til stórkøk og sær hetta út til at bera til. Meirkostnaðurin fyri at gera køkin til stórkøk sum kann gera allan matin á staðnum er 350.000 kr.

Dagtilhaldi skal flytast uppá lofti. Starvsfólkini hava viðmerkt at hetta kann verða óheppi í mun til at trupult verður hjá borgarunum at fara út um sjálvir. Starvsfólkini meta at um ein altan er í samband við dagtilhaldi kunnu borgararnir sjálvir fara at fáa sær fríska luft og vildi tað avgjørt veri ein góð loysn. Byggideildin metir somuleiðis at ein altan út frá dagtilhaldinum, er ein góð loysn, eisini í mun til brandtrygd. Meirkostnaður fyri at gera altan er 250.000 kr.

Mett verður at kostnaður fyri eyka projektering av omanfyri nevnda er 100.000 kr.

Omanfyri nevnda eru stórar betranir av umbyggingini og av bygninginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin gav ikki loyvi at gera rúmini til umlætting soleiðis sum upprunaliga ætla, tí mett var at tey vóru ov lítil og at tað ikki var wc/baðirúm til hvør kamar. Í tilmælinum hjá virkandi tekniska stjóra og virkandi leiðara á byggideildini verður tilmælt at geva byggiloyvi við teirri treyt, at verkætlanin verður endurskoða og dagførd samsvarandi dagsins normum fyri innrætting av slíkum stovnum og annars við teimum treytum sum umsitingin setur. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 18 juni 2018 at taka undir við tilmælinum.

Hetta er tikið til eftirtektar og nýtt uppskot er gjørt sum tryggjar baðirúm/wc til hvørt kamar, umframt at hvørt kamar nú er størri enn upprunaliga ætla.
Henda broyting hevur við sær, at umframt at flyta okkurt starvsfólkarúm uppá so er tali av nýggjum búrúmum nú 7 og ikki 8 sum upprunaliga ætla.

Hinvegin so eru rúmini størri og tað vera gjørd baðirúm/wc til hvørt rúm, sum sjálvandi er ein betran í mun til at tvey búrúm deila baðirúm/wc.

Fyri at gera búrúm størri og gera baðirúm/wc til hvør kamar metir TK at meirkostnaðurin er 350.000 kr. (kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

Meirkostnaður í sambandi við umbygging av Tjarnargarði er sostatt mettur at verða:

| | |
|---|---|
| Glas millumbygningur | 315.500,00 |
| Stór køkur | 350.000,00 |
| Altan | 250.000,00 |
| Eyka projektering, fyri omanfyri nevnda | 100.000,00 |
| Størri búrúm (serliga er tað baðirúm sum skapa meirkostna) | |

350.000,00 (hetta er ein meting frá TK, ein kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

| | |
|---|---|
| samanlagt | 1.365.500,00 kr. u/MVG |
| | 1.450.843,75 kr. v/6,25% MVG |

Kostnaðarmetingin av umbyggingini av Tjarnargarði sum bleiv gjørd var 23,8 mio. kr. Um omanfyrinevndu tillagingar skulu gerast heldur henda kostnaðarmeting ikki.

Við tillagingunum verður nýggja kostnaðarmetingin samla 25,3 mio kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka undir við, at omanfyrinevndu broytingar verða gjørdar í samband við umbyggingina av Tjarnargarði og at játta 1.5 mio kr. til endamáli.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við broytingunum og at játtanin verður fingin til vega á íløguætlanini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Útbjóðingartilfarið uppá út- og umbygging av Tjarnargarði frá ráðgevum er nú liðugt og endalig kostnaðarmeting fyriliggur. Endalig kostnaðarmeting fyri verkætlanina er hægri enn áður mett. Samlaður verkætlanarkostnaður áðrenn licitatión verður mettur til 35 mió kr. við øllum. Handverkaraútreiðslur eru

leypandi vorðnar hægri, umframt at summar útreiðslur ikki hava verðið íroknaðar áður. Útreiðslur til kommunalt mvg. hava ikki verið íroknaðar frá byrjan, umframt at við nýggjastu kostnaðarmetingini eru íbindingargjøld, lønar- og prísvøkstur og umsitingarkostnaðir við. Harafturat hava útreiðslur til innbúgv og útgerð ikki verðið partur av kostnaðarmetingini, og hesar eru tiknar við nú.

Í samlaða kostnaðinum nú er: 7 nýggj umlætingarpláss, uppraðfesting av venjingarhølum og dagtilhaldinum, nýggjur ídnaðarkøkur og samanbinding av báðum høvuðsbygningunum. Øll ovara hædd verður gjørd av nýggjum, og fleiri fermetrar verða tí til venjingar og dagtilhald, umframt at stórur partur av bygninginum verður høvuðsumvældur har neyðugar ábøtur verða gjørdar viðv. m.a. brunaviðurskiftum og ventilatón.

Eftir ætlan skal útbjóðingartilfarið sendast teimum bjóðandi í viku 44.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu ætlan, og at karmurin fyri verkætlanina verður hækkaður samsvarandi nýggju kostnaðarmetingini.

**Eldranevndin 09. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sp/f Kontrast hava bjóðað arbeiðið út í innbodna lisitatión. Arbeiðstakararnar eru: P/F Articon, og Sp/f Búsetur, Sp/f JEP Smíð, P/F MTHøjgaard, Sp/f Húsavarðartænastan og Sp/f Eysturlon.

Tilboðini eru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon: | 21.673.531,80 kr uttan mvg. |
| Búsetur: | 23.471.810,00 kr --- // --- |
| JEP Smíð: | 25.810.304,41 kr --- // --- |
| MTHøjgaard: | 28.486.394,00 kr --- // --- |
| Húsavarðartænastan: | 28.643.768,00 kr --- // --- |
| Eysturlon: | Tilboð ikki innlatið |

Kontrast Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við Articon, sum hevði lægsta tilboðið, til tess at útgreina tilboðið.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina at umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini á j.nr. 18/04091-01. Kostnaðarmetingin er grundað á tilboðið hjá Articon, sum er lægsta tilboðið. Í kostnaðarmetingin er HVÚ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, innbúgv, køkur o.a. íroknað.

Fyri 2018 eru 3.049 mio kr. játtaðar til verkætlanina

**Tilmæli:**
Bygginevndin hevur á fundi 22. november 2018 viðgjørt tilboð og mælir bygginevndin til at játta samlaða kostnað av (kostnaðarmeting j.nr. 18/04091-01) av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Mælt verður til at taka undir við tilboðnum hjá Articon P/F samsvarandi tilboðsupphædd og undirskrivað arbeiðstakarasáttmála.

Mælt verður samstundis til at játta løgukarmin soleiðis:

2018: 7,9 mio kr. av karminum fyri 2018

2019: 12,3 mió kr av karminum fyri 2019
2020: 10 mió kr av karminum fyri 2020

**Eldranevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við 1. byggistig av út- og umbygging av gamla Tjarnargarði eru komin viðurskifti fram, sum gera at byggingin hevur tørv á eini eykajáttan.

Fyrsta byggistig hevur havt væl størri avbjóðingar við sær, enn roknað var við.

Fleiri eru orsøkirnar fyri at verkætlanin er dýrka. M.a. er talan um rokningar fyri vantandi projektering, eyka byggiharra útreiðslur, meir- og minniveitingar og ókent.

Umsitingin hevur gjørt eina dagførda kostnaðarmeting og staðfestast kann, at tørvur er á eini eykajáttan á kr. 3.984.375 kr.

Útgreining er viðløgd.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at taka undir við at játta 3.984.375 kr. eyka av konto 6175 umsiting og røkt av fastari ogn, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 15. juni 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Annfinni Brekkstein um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn og Bogi Andreasen.

Málið beint aftur í eldranevndina.

**Iskoyti:**
Forkvinnan í eldranevndini ynskir málið á skrá.

**Eldranevndin 08. juli 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at halda fast við samtyktina í eldranevndini 15. juni 2020 og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 08. juli 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Heðini Mortensen, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Høgna Joensen:

Vísandi til at verkætlanin at umbyggja Tjarnargarð er vorðin munandi dýrari enn upprunaliga mett, og at tað nú, verkætlanin átti at verið liðug, er komið fram, at tað millum annað mangla pengar til projektering, setir minnilutin sum treyt fyri at játta írestandi upphæddina, at býráðið setur í verk eina djúptøkna kanning av møguligum feilum og mistøkum í fyrireiking, umsiting og verkseting av verkætlanini, og at býráðið fer undir at viðgera neyðugar avleiðingar av niðurstøðum í kanningini.

Við hesari treyt tekur minnilutin undir við at játta ta upphædd, sum er neyðug til tess at byggingin verður liðug og búfólkini kunnu flyta inn sum skjótast.

Broytingaruppskotið fall við fýra atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Høgni Joensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Síðandi varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini 17. juni 2020 og einum meiriluta í eldranevndini 8. juli 2020, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Høgni Joensen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Annika Olsen setti fram broytingaruppskot um at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð, og at Articon tekur yvir arbeiðstøkuna av byggistigið 2.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Anniku Olsen, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við liðugtgerð av verkætlanini at út- og umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil er staðfest, at tað skal ein meirjáttan til.

Sum áður staðfest, varð fyrsta byggistig, sum varð liðugt á sumri 2020, sera nógv seinkað og hevði stórar avbjóðingar. Ein seinkan á uml. 8 mánaðir.

Í september 2020, eftir umleið tveir mánaðir av byggistigið 2, varð gjørt av, at høvuðsráðgevin ikki skuldi halda á fram. Tó hava undirráðgevarar verið við. Hesir hava ábyrgd av konstruktiónum, bruna, EL, HVS og ventilaión.

Vónað varð tá, at møguleiki var fyri at fáa verkætlanina lidna um ársskiftið. Hetta hevur ikki hildið, og verður høvuðsarbeiðstøkan íroknað allar meir-, minni og eykaveitingar avhandað 10. mars 2021.

Av tí at sera stórar avbjóðingar hava verið við hesi verkætlanini, er hon nógv dýrkað. Samlaði eykakostnaðurin fyri at um- og útbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil, verður væntandi umleið 6,95 mió. kr.

Á býráðsfundi 25. august 2020, samtykti býráðið eina eykajáttaðan á 3,95 mió. kr.

Á byggifundi 19. oktober 2020, varð staðfest, at ein tørvur er aftur at á eini eykajáttan á uml. 2,6 mió. kr.

Síðani eru aðrar óvantaðar útreiðslur, á uml. 0,4 mió. kr. komnar afturat, so at neyðugt er við eini eykajáttan á 3,0 mió kr og ikki 2,6 mió. kr, sum fráboðað á byggifundi í oktober 2020.

Á bygginevndarfundi 01.03.2021 varð staðfest at tørvurin á eykajáttan er 3 mió. kr.

Eykajáttanin á 3,0 mió. kr. er í høvuðsheitum farin til meir- og eykaveitingar í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna. Til dømis brunaatskiljing og brunaverju, HVS og ventilatión, køk, gólv, máling og annars óvantaðar útreiðslur. Undir óvantaðar útreiðslur eru t.d. ymiskar óvantaðar broytingar og manglar, serliga í sambandi við EL-arbeiði, net og antennustik, ABDL- og ABA-skipanir.

Viðlagt er yvirlit yvir samlaða metta kostnaðin, samanborið við upprunaligu kostnaðarmetingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, verkætlanarleiðarin, Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til, at játtaðar verða 3.000.000,00 kr. til verkætlanina, fíggjað við 1.000.000 kr. av konto 2375, L00001, Løgukarmur fyri árið, og 2.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldradepil í Kollafirði, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mars 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annika Olsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at gera Tjarnargarð lidnan, men at játtanin verður funnin aðrastaðnis á fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í heilsu- og eldranevndini og játtar 3.000.000,00 kr. til verkætlanina, fíggjað við 1.000.000 kr. av konto 5775, L57015, Langhylur, og 2.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldradepil í Kollafirði, og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini. Minnilutin tekur undir við at gera Tjarnargarð lidnan, men mælir til at játtan verður funnin aðrastaðni á fíggjarætlanini.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot um at taka undir við uppskotinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða 1.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldraepil í Kollafirði og kr. 2.000.000 av konto 5775, L57015, Langhylur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Málið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Verkætlanin hevur havt avbjóðingar í og við at talan var um um- og útbygging. Støðan er nú, at leiðarin á Bygningsdeildini og stjórin á HU hava heitt er á verkætlanarleiðaran um at lokað verkætlanina. Á løgukontoini eru uml. 200.000,- kr. Eftir er at avgreiða liðugtgerð av samanbygning í millum gamla og nýggja Tjarnargarð, skifta og víðka ein serliga úthurð í rýmingarleiðini úr Kristianslon, umframt ymisk minni arbeiði. Hetta kann verða fíggjað av rakstrarkonto 6110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

1. At loka verkætlanina L27010 Út og umbygging av gamla Tjarnargarði til demensdepil
2. At restupphæddin á løgukontoini á uml. kr. 200.000 verður flutt út á karmin 2775.
3. At resterandi arbeiði kunnu verða fíggjað av rakstrarkonto 6110.
4. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

<u>Demensdepil</u>
Í løtuni eru 10 bupláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa tilboð sum er nøktar teirra tørvi á einum stað. Tað vil siga at ein borgari kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl léttari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

<u>Tilgongd víðari</u>
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18
- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017**: Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið um ráðgevarasáttmála um prosjektering. Samlaður kostnaður fyri prosjekteringsleiðslu, prosjektering, byggileiðslu og fakeftirlit er kr. 3.100.000.

Á løgukontuni L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði, eru tøkar kr. 1 mió. Játtast kunnu 2,1 mió av tøka løguarminum 2775 Eldrarøkt L00001.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at játta kr. 2,1 mió av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði.

**Eldranevndin 15. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í samband við umbygging av Tjarnargarði eru komin fram viðurskifti sum gera at kostnaðarmetingin hækkar.

Stórt ynski hevur í nógv ár verið um at byggja báðar bygningarnar saman við einum glasmillumbygningi. Við at binda bygningarnar saman kann fáast meira skynsamur rakstur tí til ber hjá starvsfólkinum at ganga inni tí bygningurin er sum ein. Mett verður at glas millumbygningur kostar 315.500 kr. at gera.

Búfólkini á Tjarnargarði fáa mat av Lágargarði, av tí at køksviðurskiftini á Tjarnargarði ikki loyva at matur í stórum mongdum verður gjørdur á staðnum. Hetta passar illa við hugburðin um at røktarheimini í Tórshavnar kommunu skulu vera heimlig. Køkur skal gerast á Tjarnargarði í samband við umbyggingina, tó er bert hugsa at køkurin skal virka á sama hátt sum higartil. Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at gera køkin til stórkøk og sær hetta út til at bera til. Meirkostnaðurin fyri at gera køkin til stórkøk sum kann gera allan matin á staðnum er 350.000 kr.

Dagtilhaldi skal flytast uppá lofti. Starvsfólkini hava viðmerkt at hetta kann verða óheppi í mun til at trupult verður hjá borgarunum at fara út um sjálvir. Starvsfólkini meta at um ein altan er í samband við dagtilhaldi kunnu borgararnir sjálvir fara at fáa sær fríska luft og vildi tað avgjørt veri ein góð loysn. Byggideildin metir somuleiðis at ein altan út frá dagtilhaldinum, er ein góð loysn, eisini í mun til brandtrygd. Meirkostnaður fyri at gera altan er 250.000 kr.

Mett verður at kostnaður fyri eyka projektering av omanfyri nevnda er 100.000 kr.

Omanfyri nevnda eru stórar betranir av umbyggingini og av bygninginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin gav ikki loyvi at gera rúmini til umlætting soleiðis sum upprunaliga ætla, tí mett var at tey vóru ov lítil og at tað ikki var wc/baðirúm til hvør kamar. Í tilmælinum hjá virkandi tekniska stjóra og virkandi leiðara á byggideildini verður tilmælt at geva byggiloyvi við teirri treyt, at verkætlanin verður endurskoða og dagførd samsvarandi dagsins normum fyri innrætting av slíkum stovnum og annars við teimum treytum sum umsitingin setur. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 18 juni 2018 at taka undir við tilmælinum.

Hetta er tikið til eftirtektar og nýtt uppskot er gjørt sum tryggjar baðirúm/wc til hvørt kamar, umframt at hvørt kamar nú er størri enn upprunaliga ætla.
Henda broyting hevur við sær, at umframt at flyta okkurt starvsfólkarúm uppá so er tali av nýggjum búrúmum nú 7 og ikki 8 sum upprunaliga ætla.

Hinvegin so eru rúmini størri og tað vera gjørd baðirúm/wc til hvørt rúm, sum sjálvandi er ein betran í mun til at tvey búrúm deila baðirúm/wc.

Fyri at gera búrúm størri og gera baðirúm/wc til hvør kamar metir TK at meirkostnaðurin er 350.000 kr. (kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

Meirkostnaður í sambandi við umbygging av Tjarnargarði er sostatt mettur at verða:

| | |
|---|---|
| Glas millumbygningur | 315.500,00 |
| Stór køkur | 350.000,00 |
| Altan | 250.000,00 |
| Eyka projektering, fyri omanfyri nevnda | 100.000,00 |
| Størri búrúm (serliga er tað baðirúm sum skapa meirkostna) | |

350.000,00 (hetta er ein meting frá TK, ein kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

| | |
|---|---|
| samanlagt | 1.365.500,00 kr. u/MVG |
| | 1.450.843,75 kr. v/6,25% MVG |

Kostnaðarmetingin av umbyggingini av Tjarnargarði sum bleiv gjørd var 23,8 mio. kr. Um omanfyrinevndu tillagingar skulu gerast heldur henda kostnaðarmeting ikki.

Við tillagingunum verður nýggja kostnaðarmetingin samla 25,3 mio kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka undir við, at omanfyrinevndu broytingar verða gjørdar í samband við umbyggingina av Tjarnargarði og at játta 1.5 mio kr. til endamáli.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við broytingunum og at játtanin verður fingin til vega á íløguætlanini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Útbjóðingartilfarið uppá út- og umbygging av Tjarnargarði frá ráðgevum er nú liðugt og endalig kostnaðarmeting fyriliggur. Endalig kostnaðarmeting fyri verkætlanina er hægri enn áður mett. Samlaður verkætlanarkostnaður áðrenn licitatión verður mettur til 35 mió kr. við øllum. Handverkaraútreiðslur eru leypandi vorðnar hægri, umframt at summar útreiðslur ikki hava verðið íroknaðar áður. Útreiðslur til kommunalt mvg. hava ikki verið íroknaðar frá byrjan, umframt at við nýggjastu kostnaðarmetingini eru íbindingargjøld, lønar- og prísvøkstur og umsitingarkostnaðir við. Harafturat hava útreiðslur til innbúgv og útgerð ikki verðið partur av kostnaðarmetingini, og hesar eru tiknar við nú.

Í samlaða kostnaðinum nú er: 7 nýggj umlætingarpláss, uppraðfesting av venjingarhølum og dagtilhaldinum, nýggjur ídnaðarkøkur og samanbinding av báðum høvuðsbygningunum. Øll ovara hædd verður gjørd av nýggjum, og fleiri fermetrar verða tí til venjingar og dagtilhald, umframt at stórur partur av bygninginum verður høvuðsumvældur har neyðugar ábøtur verða gjørdar viðv. m.a. brunaviðurskiftum og ventilatón.

Eftir ætlan skal útbjóðingartilfarið sendast teimum bjóðandi í viku 44.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu ætlan, og at karmurin fyri verkætlanina verður hækkaður samsvarandi nýggju kostnaðarmetingini.

**Eldranevndin 09. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sp/f Kontrast hava bjóðað arbeiðið út í innbodna lisitatión. Arbeiðstakararnar eru: P/F Articon, og Sp/f Búsetur, Sp/f JEP Smíð, P/F MTHøjgaard, Sp/f Húsavarðartænastan og Sp/f Eysturlon.

Tilboðini eru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon: | 21.673.531,80 kr uttan mvg. |
| Búsetur: | 23.471.810,00 kr --- // --- |
| JEP Smíð: | 25.810.304,41 kr --- // --- |
| MTHøjgaard: | 28.486.394,00 kr --- // --- |
| Húsavarðartænastan: | 28.643.768,00 kr --- // --- |
| Eysturlon: | Tilboð ikki innlatið |

Kontrast Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við Articon, sum hevði lægsta tilboðið, til tess at útgreina tilboðið.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina at umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini á j.nr. 18/04091-01. Kostnaðarmetingin er grundað á tilboðið hjá Articon, sum er lægsta tilboðið. Í kostnaðarmetingin er HVÚ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, innbúgv, køkur o.a. íroknað.

Fyri 2018 eru 3.049 mio kr. játtaðar til verkætlanina

**Tilmæli:**
Bygginevndin hevur á fundi 22. november 2018 viðgjørt tilboð og mælir bygginevndin til at játta samlaða kostnað av (kostnaðarmeting j.nr. 18/04091-01) av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Mælt verður til at taka undir við tilboðnum hjá Articon P/F samsvarandi tilboðsupphædd og undirskrivað arbeiðstakarasáttmála.

Mælt verður samstundis til at játta løgukarmin soleiðis:

| | |
|---|---|
| 2018: | 7,9 mio kr. av karminum fyri 2018 |
| 2019: | 12,3 mió kr av karminum fyri 2019 |
| 2020: | 10 mió kr av karminum fyri 2020 |

**Eldranevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við 1. byggistig av út- og umbygging av gamla Tjarnargarði eru komin viðurskifti fram, sum gera at bygginginin hevur tørv á eini eykajáttan.

Fyrsta byggistig hevur havt væl størri avbjóðingar við sær, enn roknað var við.

Fleiri eru orsøkirnar fyri at verkætlanin er dýrka. M.a. er talan um rokningar fyri vantandi projektering, eyka byggiharra útreiðslur, meir- og minniveitingar og ókent.

Umsitingin hevur gjørt eina dagførda kostnaðarmeting og staðfestast kann, at tørvur er á eini eykajáttan á kr. 3.984.375 kr.

Útgreining er viðløgd.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at taka undir við at játta 3.984.375 kr. eyka av konto 6175 umsiting og røkt av fastari ogn, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 15. juni 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Annfinni Brekkstein um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn og Bogi Andreasen.

Málið beint aftur í eldranevndina.

**Iskoyti:**
Forkvinnan í eldranevndini ynskir málið á skrá.

**Eldranevndin 08. juli 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at halda fast við samtyktina í eldranevndini 15. juni 2020 og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 08. juli 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Heðini Mortensen, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Høgna Joensen:

Vísandi til at verkætlanin at umbyggja Tjarnargarð er vorðin munandi dýrari enn upprunaliga mett, og at tað nú, verkætlanin átti at verið liðug, er komið fram, at tað millum annað mangla pengar til projektering, setir minnilutin sum treyt fyri at játta írestandi upphæddina, at býráðið setur í verk eina djúptøkna

kanning av møguligum feilum og mistøkum í fyrireiking, umsiting og verkseting av verkætlanini, og at býráðið fer undir at viðgera neyðugar avleiðingar av niðurstøðum í kanningini.

Við hesari treyt tekur minnilutin undir við at játta ta upphædd, sum er neyðug til tess at byggingin verður liðug og búfólkini kunnu flyta inn sum skjótast.

Broytingaruppskotið fall við fýra atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Høgni Joensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Síðandi varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini 17. juni 2020 og einum meiriluta í eldranevndini 8. juli 2020, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Høgni Joensen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Annika Olsen setti fram broytingaruppskot um at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð, og at Articon tekur yvir arbeiðstøkuna av byggistigið 2.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Anniku Olsen, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við liðugtgerð av verkætlanini at út- og umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil er staðfest, at tað skal ein meirjáttan til.

Sum áður staðfest, varð fyrsta byggistig, sum varð liðugt á sumri 2020, sera nógv seinkað og hevði stórar avbjóðingar. Ein seinkan á uml. 8 mánaðir.

Í september 2020, eftir umleið tveir mánaðir av byggistigið 2, varð gjørt av, at høvuðsráðgevin ikki skuldi halda á fram. Tó hava undirráðgevarar verið við. Hesir hava ábyrgd av konstruktiónum, bruna, EL, HVS og ventilaión.

Vónað varð tá, at møguleiki var fyri at fáa verkætlanina lidna um ársskiftið. Hetta hevur ikki hildið, og verður høvuðsarbeiðstøkan íroknað allar meir-, minni og eykaveitingar avhandað 10. mars 2021.

Av tí at sera stórar avbjóðingar hava verið við hesi verkætlanini, er hon nógv dýrkað. Samlaði eykakostnaðurin fyri at um- og útbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil, verður væntandi umleið 6,95 mió. kr.

Á býráðsfundi 25. august 2020, samtykti býráðið eina eykajáttaðan á 3,95 mió. kr.

Á byggifundi 19. oktober 2020, varð staðfest, at ein tørvur er aftur at á eini eykajáttan á uml. 2,6 mió. kr.

Síðani eru aðrar óvantaðar útreiðslur, á uml. 0,4 mió. kr. komnar afturat, so at neyðugt er við eini eykajáttan á 3,0 mió kr og ikki 2,6 mió. kr, sum fráboðað á byggifundi í oktober 2020.

Á bygginevndarfundi 01.03.2021 varð staðfest at tørvurin á eykajáttan er 3 mió. kr.

Eykajáttanin á 3,0 mió. kr. er í høvuðsheitum farin til meir- og eykaveitingar í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna. Til dømis brunaatskiljing og brunaverju, HVS og ventilatión, køk, gólv, máling og annars óvantaðar útreiðslur. Undir óvantaðar útreiðslur eru t.d. ymiskar óvantaðar broytingar og manglar, serliga í sambandi við EL-arbeiði, net og antennustik, ABDL- og ABA-skipanir.

Viðlagt er yvirlit yvir samlaða metta kostnaðin, samanborið við upprunaligu kostnaðarmetingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, verkætlanarleiðarin, Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til, at játtaðar verða 3.000.000,00 kr. til verkætlanina, fíggjað við 1.000.000 kr. av konto 2375, L00001, Løgukarmur fyri árið, og 2.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldradepil í Kollafirði, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mars 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annika Olsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at gera Tjarnargarð lidnan, men at játtanin verður funnin aðrastaðnis á fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í heilsu- og eldranevndini og játtar 3.000.000,00 kr. til verkætlanina, fíggjað við 1.000.000 kr. av konto 5775, L57015, Langhylur, og 2.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldradepil í Kollafirði, og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini. Minnilutin tekur undir við at gera Tjarnargarð lidnan, men mælir til at játtan verður funnin aðrastaðni á fíggjarætlanini.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot um at taka undir við uppskotinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða 1.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldraepil í Kollafirði og kr. 2.000.000 av konto 5775, L57015, Langhylur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Málið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**

Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Verkætlanin hevur havt avbjóðingar í og við at talan var um um- og útbygging. Støðan er nú, at leiðarin á Bygningsdeildini og stjórin á HU hava heitt er á verkætlanarleiðaran um at lokað verkætlanina. Á løgukontoini eru uml. 200.000,- kr. Eftir er at avgreiða liðugtgerð av samanbygning í millum gamla og nýggja Tjarnargarð, skifta og víðka ein serliga úthurð í rýmingarleiðini úr Kristianslon, umframt ymisk minni arbeiði. Hetta kann verða fíggjað av rakstrarkonto 6110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

5. At loka verkætlanina L27010 Út og umbygging av gamla Tjarnargarði til demensdepil
6. At restupphæddin á løgukontoini á uml. kr. 200.000 verður flutt út á karmin 2775.
7. At resterandi arbeiði kunnu verða fíggjað av rakstrarkonto 6110.
8. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Málið beint aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2024:** Samtykt at taka undir við punkt 1, 2 og 4.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

## 13/24 Útstykking á Signabø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 113/23 | 23/03516-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 201/23 | 23/03516-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 16/24 | 23/03516-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 3/24 | 23/03516-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 15/24 | 23/03516-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 13/24 | 23/03516-2 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | 26.02.2024 | 4/24 | 23/03516-2 |

**Upprunin til málið**
Á seinasta borgararfundi í Kollafirði tann 18. apríl 2023 bleiv nógv umrøða um manglandi møguleikar fyri at seta búgv í Kollafirði, tí onki tøkt byggilendi er í bygdini.

**Lýsing av málinum**
Tekniski stjórin hevur í hesum sambandi fingið fyrispurning frá Betri Banka, um Tórshavnar kommuna er sinnað at keypa eina trøð á Signabø. Talan er um matr. Nr. 283a og matr. Nr. 283d, íalt 12.842 fermetrar, fyri ein fermetraprís á 200 kr, sum gevur ein samlaðan kostnað uppá kr. 2.568.400.

Tann parturin av matrikul nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin, og sum hevur eina vídd uppá 10.218 m$^2$, er vælegnað til sethúsaútstykking. Kostnaðurin fyri henda partin av trøðni er kr. 2.043.00.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Tann parturin av matr. Nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin, liggur í almennu byggisamtyktini í umráðispartinum A1, sum er til lága bústaðarbygging. Har er ásett, at grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m$^2$ til víddar, og um serstøk byggisamtykt verður gjørd, í minsta lagi 400 m$^2$ til víddar.

Tann parturin av matr. Nr. 283a, sum liggur niðanfyri vegin, og matr. Nr. 283d, liggja í almennu byggisamtyktini partvíst í umráðispartinum N (ella F), sum er neystaøki og partvíst í 4. grundumráði, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur hugt eftir møguleikanum at útstykkja tann partin av matr. Nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin. Tað ber til at fáa upp til 18 grundstykkir, sum verða góðar 400 m$^2$ til víddar.

Vegir, parkering, fríøki og annað skal skipast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini og eini komandi serstakari byggisamtykt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Fyrispurningur frá Betri Banka
- Støðuætlan – Kort yvir matrikul 283a

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til:

- At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Betri banka um at keypa tann partin av matr. Nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin til at stykkja út.
- At heimila umsitingini at gera útbjóðingartilfar fyri økið og at bjóða ætlanina at gera útstykkingina út í heildararbeiðstøku sum undirhondsboð.
- At tá ið tilboðini eru komin inn, at leggja málið fyri nevndina aftur til endaliga støðutakan.
- At gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið, at leggja fyri nevndina aftur og umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at fáa til vega tilboð, har øll stykkini eru byggibúgvin, og at lýsa stykkini til sølu fyri at síggja, hvørt áhugi er.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mælir til, at annaðhvørt raðhús ella tvíhús verða bygd í ovaru helvt av trøðni.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Tveir arbeiðstakarar eru bidnir um at geva boð upp á at gera umrøddu útstykkingina í heildararbeiðstøku.

Í útboðnum vórðu treytir upplýstar og eftir hvørjum leisti innkomnu uppskotini/tilboðini verða dømd. Her var talan um ein stiga frá 0 – 10 har:

- Prísur, vekting 60%
- Tíðarætlan, vekting 10%
- Økisskipan, vekting 7,5%
- Skipan av fríøki, vekting 7,5%
- Felags parkering, vekting 5%
- Lendistillaging í praksis, vekting 2,5%
- Lendistillaging í útsjónd, vekting 5%
- Avvatning, vekting 2,5%

Dømingin var gjørd soleiðis at:

- 0 varð givið fyri, at parturin ikki var uppfyltur
- 3 fyri at parturin var uppfyltur í avmarkaðan mun
- 5 fyri at parturin var lutvíst uppfyltur
- 8 fyri at parturin var uppfyltur, tó við smærri lýtum
- 10 fyri at parturin var uppfyltur til fulnar

Innkomu tilboð frá Hallur Hansen, Entreprenørur Spf. Og Við Sjógv Spf. Kostnaðirnir av tilboðunum vóru hesir:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: kr. 7.966.384,-
- Við Sjógv, Spf.: kr. 9.251.878,-

Eftir leistinum, sum innkomnu tilboðini/uppskotini skuldu dømast, var úrslitið hetta:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: 7,8
- Við Sjógv, Spf.: 7,4

Í høvuðsheitum fekk verkætlanin hjá við Sjógv betri met fyri økisskipan, skipan av fríøki, felags parkering, lendistillaging – bæði í praksis og í útsjónd – og í mun til avvatning. Men av tí at prísur og tíðarætlan eru vektað við til samans 70%, so verður úrslitið, at verkætlanin hjá Halli Hansen verður dømd hægri.

Verkætlanin hjá Halli Hansen, entreprenøri Spf., hevur tó sambært tilboðnum ein kostnað á 442.577 kr. Fyri hvørt av teimum 18 grundstykkjunum umframt kostnaðin av eftirliti og byggiharraveitingum annars og keyp av lendi. Hetta kann koma til samans at verða uml. 700 tkr. Fyri hvørt stykki.

Á borgarafundum í Kollafirði í 2023 kom fram, at ynski er ikki um at keypa grundstykkir fyri henda kostnað, tá tilsvarandi grundstykkir í grannakommunum kunnu fáast fyri niður í 320 tkr.
Eisini vísa royndirnar frá útstykkingini á Hamrabø, at neyðugt var, at lækka prísin fyri grundstykkini.
Niðurstøðan er tí, at mælt verður til, at rættast er at bjóða hesi grundstykkini út fyri at staðfesta áhugan millum møguligar keyparar, áðrenn farið verður víðari við at keypa lendið og byggibúgva grundstykkini og gera veg og annað tilhoyrandi.

Neyðugt verður at játtað 12,7 mio til verkætlanina sum eykajáttan av konto 6475, um nóg stór undirtøka verður til útstykkingina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| **Býráðsfundur**<br>25. januar 2024 | Blað nr.: 49 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Signabø | | 12.700.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 12.700.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 50.000,- |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at umsitingini verður heimilað at keypa lendi frá Betri banka fyri kr. 2.043.000,-kr., treytað av at nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini
- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- er nóg stór undirtøka til verkætlanina, verður komið aftur í nevnd at biðja um heimild at fara víðari við samráðingunum og at fyrireika verkætlanina.
- at beina málið í Býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býrskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at grundstykkjakostnaðurin er kr. 500.000 kr.

Málið beint til aðru viðgerð.

# 14/24 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 140/21 | 21/02624-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 176/21 | 21/02624-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 184/21 | 21/02624-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 244/21 | 21/02624-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 330/21 | 21/02624-2 |
| 6 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 320/21 | 21/02624-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 28/22 | 21/02624-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 42/22 | 21/02624-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 35/22 | 21/02624-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 106/22 | 21/02624-2 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 158/22 | 21/02624-2 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 128/23 | 21/02624-2 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 17/24 | 21/02624-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 4/24 | 21/02624-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 16/24 | 21/02624-2 |
| 16 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 14/24 | 21/02624-2 |
| 17 Kollafjarðarnevndin | 26.02.2024 | 3/24 | 21/02624-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er byrjað sum eitt politiskt mál.

**Lýsing av málinum**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í kommununi. Politiskt er ynski at royna aðrar leiðir fyri at nøkta tørvin á bústøðum, og tí verður farið undir at bjóða privatum mennarum at keypa part av matr. nr. 203c í Kollafirði fyri at menna til bústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 203c, og upprunaliga var ætlanin at stykkja lendið út saman við parti av matriklunum niðanfyri út til sethúsagrundir. Hendan ætlanin kom ongantíð á mál, og nú er ynski so at bjóða part av økinum út til aktørar at menna til bústaðir. Ætlanin er at selja uml. 3600 fermetrar í fríari sølu. Sí kortskjal, øki til sølu, journal nr. 21/02624-4.

Í sambandi við útboðið verður krav sett um, at tað skulu byggjast íbúðir ella raðhús. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað og hvat slag av bústøðum verða bygd. Bústaðirnir kunnu verða bygdir sum eigara- ella leigubústaðir.

Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.
Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av bústøðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur um byggingin er fjølbroytt og at atlit verður tikið til umhvørvið og stórfingna útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.

Útbjóðingin og sølan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta, snøgga og dygdargóða bústaðarloysn, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul nr. 203c liggur í umráðispartinum A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnesi í Kollafirði galdandi fyri økið, sí skjal nr. 21/02624-3.

Tá vinanndi verkætlanin verður ment, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ætlanunum fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at tryggja, at innkomnu tilboðini verða gjøgnumgingin við atliti at tryggja, at tað sum ætlanin er at fara undir at byggja hóskar til umhvørvið og fellir væl inn í økið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum enn.

**Skjøl**
Øki til sølu, journal nr. 21/02624-4
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnnesi í Kollafirði, journal nr. 21/02624-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnardeildini og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c verður boðin út í fríari sølu við endamálinum at menna bústaðir á ognini eins og omanfyri lýst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 15. november 2021, kl. 12 var farin, var eitt tilboð innkomið.

Tilboðið er frá Jóan Petur Vang áljóðandi kr. 1.586.000 við Kontrast, sum ráðgeva.
Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 350,00 fyri teir 4.480 fermetrarnar, ið er júst sama upphædd sum kostnaðarmetingin fyri lendið frá útboðstilfarinum. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskoti og við eini treyt um at graviloyvið verður givið soleiðis, at grevstur longu kann setast ígongd 1. mars 2022. Um hetta kann lata seg gera, fer byggingin ígongd pr. 1. juni 2022 og varðar uml. í 22 mánaðir, sí fylgiskjal *Upplegg 1.1.pdf.*

Ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri økið skal gerast, ið loyvir bygging sambært uppskotinum. Hetta merkir, at áðrenn graviloyvi kann gevast, skal serstaka byggisamtyktin liggja til almenna hoyring í seks vikur, fyri síðan at góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Ein tílík tilgongd plagar at taka millum ein til tríggjar mánaðir. Tí fer tað ikki at bera til at ganga treytini á møti og ein samráðing skal tí takast upp við tilboðsgevaran.

Talan er um níggju raðhús og fýra punkthús við tveimum íbúðum í hvørjum.
Støddirnar á raðhúsunum eru 125 fermetrar deilt yvir tvær fullar hæddir, umframt p-kjallara. Punkthúsini hava tvær íbúðir, ið eru ávikavist 75 og 100 fermetrar.

Búeindirnar hava nøktandi p-pláss. Tó ynskir kommunan eina øðrvísi skipan av teimum, soleiðis at fleiri verða á felagsøki, til tá føðingardagar o.a. er í økinum.

Økið er væl skipað við varðveittum bøgarði. Umsitingin metir tað sum eina styrki fyri dámin í økinum, at punkthúsini standa forskotin. Hetta er ikki ein vanligur háttur at staðseta hús á bygd, men hetta gevur meining í mun til gjøgnumtrek og sólargang.
Prinsippið við at byggja høgt upp móti hamrum er nakað, ið kommunan ynskir at síggja meiri av. Bygningarnir taka ikki útsýni umframt at hamarin skapar lívd.

Sum nevnt skal nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast. Frávik skal gerast í nýggju serstøku byggisamtyktini, ið loyvir íbúðarbygging. Hæddin er hægri enn tann, ið er loyvd í A1 økjum og tí skal frávik eisini gevast til hetta. Orsøkin til høgu byggingina er, at parkering er undir raðhúsabygningunum. Hetta hevur nakrar fyrimunir við sær, ið kommunan átti at stuðla. Lendisnýtslan verður meiri effektiv og tann parturin, ið annars hevði blivið asfalteraður til p-pláss, kann blíva lagdur sum t.d. grønt øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- Jóan Petur Vang fær í boði at keypa lendið til íbúðir og raðhús fyri tilboðsupphæddina kr. 1.586.000
- farið verður undir at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c í Kollafirði í samráð við keyparan av lendinum
- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at byggingin skal fara í gongd innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samband við Jóan Petur Vang um treytirnar, sum hann setir í tilboðnum um at fáa graviloyvi pr. 1. mars 2022 og at keypspeningurin fyri stykkið skal innganga í vegagerð og felagsøki, sum kommunan skal yvirtaka, tá verkætlanin er liðug. Samanumtikið kunnu vit ikki góðkenna treytir, og av tí sama hevur Jóan Petur Vang valt at trekkja tilboðið aftur.

Umsitingin hevur viðgjørt treytirnar og komin fram til hesar grundgevingar:
- Byggi- og graviloyvi kann ikki útvegast, áðrenn ein serstøk byggisamtykt er endaliga góðkend.
- Sambært kommunustýrislógini § 50, stk., ið bannar stuðli til einstaklingar, hevur kommunan ikki heimild til at gera eina avtalu, sum inniber, at keypspeningurin fyri lendið gongur inn aftur í egnu verkætlan í form av gjaldi fyri vegagerð. Hetta vildi verið at meta við at fáa lendið ókeypis. Um vit loyvdu einari slíkari treyt at inngingið í handilin eftirfylgjandi, vildi tað eisini verið í stríð við reglurnar um útboð av kommunalari fastogn tí onnur, sum møguliga høvdu í huga at bjóða upp á lendið, hava ikki fingið hendan møguleikan.

Ynskiligt er tó framvegis at fáa fleiri búeindir í kommununi og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c í Kollafirði verður boðin útaftur av nýggjum í fríari sølu og við somu treytum sum áður, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina..

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og byárskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um, at tá freistin at lata tilboð inn 30. mars 2022, kl. 12, var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið matr. nr. 203c í Kollafirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Nevndin ynskir, at verkætlanin verður boðin út enn einaferð.

**Ískoyti**
Kunnað verður um, at tá freistin at lata tilboð inn 1. august 2022, kl. 12, var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið matr.nr. 203c í Kollafirði. Ynskiligt er framvegis at fáa fleiri fjøllbroyttar búeindir í kommununi, og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur í heyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Samtykt at bjóða út aftur í heyst 2022.

**Ískoyti:**
Enn ein útbjóðing av matr. nr. 203c hevur verið, men hevur eingin áhugi verið fyri útboðnum, og er tískil heldur einki tilboð innkomið.

Í sambandi við at bústaðareindir mangla í Kollafirði, mælir umsitingin til at skipa økið við 10 sethúsum í staðin, soleiðis at økið í staðin fyri at byggja rað- og íbúðarhús verður til eina vanliga sethúsaútstykking.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til, hvussu økið kann skipast, sí skjal nr. 21/02624-22, Sethúsaútstykking á Lygnesi_Uppskot01_24aug2023. Sum sæst á tekningini, er partur av útstykkingini privat jørð. Umsitingin hevur sett seg í samband við eigararnar av matr. nr. 308, 309 og 209a, sum siga seg vera sinnaðar at selja part av sínum lendi til útstykkingina.

Mett verður, at tað er ráðiligt at fara undir hesa útstykkingina á sama hátt, sum fyri útstykkingina á Signabø, mál nr. 23/03516, sum er farið í undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við privatu eigararnar av matr. nr. 308, 309 og 209a um at keypa tann partin av teirra ogn, sum er neyðugur fyri at gera útstykkingina.
- At heimila umsitingini at gera útbjóðingartilfar fyri økið og at bjóða ætlanina at gera útstykkingina út í heildararbeiðstøku sum undirhondsboð.
- At tá ið tilboðini eru komin inn og keypskostnaðurin er kendur, at leggja málið fyri nevndina aftur til endaliga støðutakan.
- At gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri útstykkingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 11.01.2024:**

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigararnar av matr.nr. 308, 309 og 209a, sum allir eru sinnaðir at selja lendið fyri uml. 300 kr.m²

Eigarin av matr.nr. 308, hevur ynski um at keypa ein geira millum vegin, á Lygnnesi. Geirin er uml 62 m². Endamálið við keypinum er, at hann hevur møguleika til at sundurbýta matrikulin til sethúsagrundstykki við atkomu frá vegnum.
Kommunan skal keypa uml. 172 m² frá honum, og verður tí talan um at keypa netto uml. 110 m²

Tørvur á lendi.

| Matr.nr. | m² | | kostnaður. |
|---|---|---|---|
| 309 | 1030 | | 309.000,- |
| 209a | 127 | | 38.100,- |
| 308 | 172 | netto 110 m² | 33.000,- |
| Tls. | | | 380.000,- |

Kostnaður til tinglýsing og matrikulering er mettur til uml. 26.000,- og verður mettur kostnaður í alt uml. 410.000,- kr.

Inn eru komin tvey tilboð frá arbeiðstakarunum Við Sjógv Spf. og Hallur Hansen, entreprenørur Spf. upp á heildararbeiðstøku at gera upp til 10 grundstykkir byggibúgvin við tilhoyrandi infrakervi og kringumstøðum.

Í útboðnum vóru treytir upplýstar og eftir hvørjum leisti innkomnu uppskotini/tilboðini verða dømd. Her var talan um ein stiga frá 0 - 10 har:

- Prísur, vekting 60%
- Tíðarætlan, vekting 10%
- Økisskipan, vekting 7,5%
- Skipan av fríøki, vekting 7,5%

- Felags parkering, vekting 5%
- Lendistillaging í praksis, vekting 2,5%
- Lendistillaging í útsjónd, vekting 5%
- Avvatning, vekting 2,5%

Dømingin var gjørd soleiðis at:
- 0 varð givið fyri, at parturin ikki var uppfyltur
- 3 fyri at parturin var uppfyltur í avmarkaðan mun
- 5 fyri at parturin var lutvíst uppfyltur
- 8 fyri at parturin var uppfyltur, tó við smærri lýtum
- 10 fyri at parturin var uppfyltur til fulnar

Inn komu tilboð frá Hallur Hansen, Entreprenørur Spf. og Við Sjógv Spf. Kostnaðurin av tilboðunum vóru hesir:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: kr. 5.173.420,-
- Við Sjógv, Spf.: kr. 5.450.871,-

Eftir leistinum, sum innkomnu tilboðini/uppskotini skuldu dømast kundi tilboðið frá Við Sjógv einans dømast út frá tilboð og nøgdarlista, og ikki út frá hinum parametrunum. Tí hevur døming ikki verið framd av tilboðunum báðum, men einans hevur verið eftirkannað um tilboðið frá Hallur Hansen, entreprenøri Spf., heldur tey krøv, sum eru sett fyri tilfarinum. Úrslitið er, at tilboðið heldur hesi krøv. Arbeiðstakarin metir, at arbeiðið tekur 12 mánaðir.

Samlaði kostnaðurin fyri hesa útstykking verður uml. kr. 7.000.000,-. Talan er tá um 9 grundstykki, sum so statt koma at hava ein kostprís á uml. kr. 780.000,-. Á borgarafundum í Kollafirði í 2023 kom fram, at ynski er ikki um at keypa grundstykkir fyri henda kostnað, tá tilsvarandi grundstykkir í grannakommunum kunnu fáast fyri niður í 320 tkr. Eisini vísa royndirnar frá útstykkingini á Hamrabø, at neyðugt var at lækka prísin fyri grundstykkini. Tí verður mett, at rættast er at bjóða hesi grundstykkini út fyri at staðfesta áhugan millum møguligar keyparar, áðrenn farið verður víðari við at keypa lendið og byggibúgva grundstykkini og gera veg og annað tilhoyrandi.

Neyðugt verður at játtað kr. 7,0 mio til verkætlanina sum eykajáttan, treytað av at nóg stórur áhugi er til verkætlanina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☒ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Lygnnesi | | 7.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 7.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 30.000,- |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at keypa lendið frá privatu eigarunum fyri ein samlaðan kostnað á uml. kr. 410.000, íroknað útreiðslur til matrikulering og tinglýsing, treytað av at nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini.

Harumframt mæla tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin til at:

- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- er nóg stór undirtøka til verkætlanina, verður komið aftur í nevnd at biðja um heimild at fara víðari við samráðingunum og at fyrireika verkætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at grundstykkjakostnaðurin er kr. 500.000 kr.

Málið beint til aðru viðgerð.

# 15/24 Framtíðar byggilendi í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2023 | 70/23 | 23/02421-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 140/23 | 23/02421-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 12/24 | 23/02421-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 26.02.2024 | 2/24 | 23/02421-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 18/24 | 23/02421-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 17/24 | 23/02421-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 15/24 | 23/02421-1 |
| 8 Kollafjarðarnevndin | | | 23/02421-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu tíðina hava borgarar í Kollafirði gjørt vart við, at fólkatalið í bygdini støðugt er minkandi, og hava tey somuleiðis víst á, at Tórshavnar kommuna tykist at hava gloymt at býarmenna bygdina.

18. apríl 2023 var almennur borgarafundur í skúlanum, har nógv fólk var møtt upp at vísa á trupulleikarnar við minkandi fólkatalinum, umframt at umrøða onnur viðkomandi viðurskiftir í bygdini.

Tórshavnara kommuna ásannar, at bygdini tørvar eina heildarætlan, sum kann vera við til at styrkja um samleikan í bygdini, og sum tryggjar eina framtíðar planlegging av bygdini.

**Lýsing av málinum**
Á borgarafundinum vísti kommunan á, hvørjar ætlanir hava verið í umbúnað í Kollafirði gjøgnum árini, men at hesar í fleiri førum steðga upp, grundað á at trupult hevur verið at ogna sær lendi til bygging.

Bygdini tørvar eina heildarætlan fyri at tryggja samleikan í bygdini og fyri at økja um búsetingina.

Síðani samanleggingina millum báðar kommunurnar, hevur verið nógv tosað um, hvønn samleika ella hvønn leiklut Kollafjørður fór at hava sum partur av Tórshavnar kommunu. Ynskiligt hevur verið, og eisini grundað á geografisku frástøðuna til høvuðsstaðin, at bygdin framhaldandi fór at varðveita bygdardámin, men ynski hevur eisini alla tíðina verið, at bygdin fór at vaksa nógv meiri, enn hon er.
Beint eftir samanleggingina varð sagt, at nøkur av teimum týdningarmiklastu fyribrigdunum, sum ímynda Kollafjørð eru:
- Landbúnaðurin
- Havnaøkið

Men árini hava eisini víst, at bygdalívið so sanniliga hevur ment seg, og at Kollafjørður í dag hevur nútímans hentleikar innan fleiri tænastuøki, ítrótturin er í støðugari menning, og bygdarfólkið ger sítt fyri at virka í bygdini og harvið geva bygdini fólkaliga og bygdarliga dámin. Tó væntar ein miðsavning av bygdini. Um bygdin skal vaksa og nøkta tørvin hjá samtíðarborgaranum, verður neyðugt at skipa eitt miðsavnandi øki, har trivnaður, mentan og handilslív fær ein avgerandi leiklut.

Býarskipanarliga verður mett, at tað er av stórum týdningi, at økið "við Sjógv" verður lýst sum miðstaður í bygdini, og at framtíðar útbyggingar í bygdini taka útgangsstøði í hesum økinum. Økið hevur í dag handil, kirkju, skúla, barnagarð, ítróttarhøll og nógv annað virksemið. Útboðið av bústøðum í økinum er tó sera avmarkað, og tí verður mælt til, at lendið fram við Botnánna verður lagt av til miðsavningina og menningina

av bygdini. Víst verður til kortskjal j.nr. 23/02421-2, *Øki til býarmenning*, har reyðlitti ringurin sýnir miðstaðin “við Sjógv”, og har gullittu ringarnir sýna økir, sum ynskiligt er at fara undir at býarmenna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu ásetir, hvørjar økisásetingar eru galdandi fyri Kollafjørð.
Økið sunnan fyri Botnánna liggur sum D3-øki, sum er kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
Økið norðan fyri skúlan og ítróttarhøllina liggur partvís sum A1-øki, sum er til lága bústaðarbygging, og 4. Grundumráði, sum í høvuðsheitum er lagt av til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mál nr. 2002-2500, Uppskot til framtíðarbyggisamtykt fyri Kollafjørð:
Í 2003 varð mál lagt til politiska støðutakan viðv. at leggja øki av til framtíðar útbyggingar í Kollafirði. Uppskotið var partur av arbeiðinum at gera eina heildarætlan fyri kommununa. Fleiri øki vóru í uppskoti at leggja av til bústaðabygging, sí skjal 23/02421-4, *Heildarætlan Kollafjørður jan 2003*, og málslýsingina fyri málið, sum tá varð lagt fyri, í skjali nr. 23/02421-3, *Málslýsing_Uppskot til framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð j. nr. 200202500*.

Seinasta kommunala útstykkingin, sum er gjørd í Kollafirði er tann á Hamrabøi. Hendan útstykkingin fevndi um 22 grundstykkir, og vóru grundstykkini lutaði út í 2018, og nú 5 ár seinni eru enn 10 grundstykkir, sum ikki eru í gongd við byggingina.

Í 2022 royndi kommunan at bjóða matr. nr. 203c á Lygnnesi út til bygging av íbúðum og raðhúsum. Stykkið varð boðið út í tveimum umførum, men tíverri bar ikki á mál við eini ítøkiligari sølu og ætlan fyri økið. Víst verður til mál nr. 21/02624, *Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðabygging*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kollafjarðar kjommuna viðgjørdi á fundi í des 2000 umsókn frá Kollafjarðar kirkjuráði um staðseting av nýggjari kirkju í Kollafirði. Bygdaráðið tók undir við Kirkjuráðnum, at kirkjan skuldi staðsetast við Sjógv. Tá kommunurnar løgdu saman, fór áheitanin víðari til Tórshavnar kommunu. Seinast málið hevur verið viðgjørt í politiskum høpi er í 2007.
Nú ætlanin er at fara undir eina miðsavnan og býarmenning av økinum við Sjógv, so verður mælt til, at hetta málið somuleiðis verður tikið við í tilgongdina. Víst verður til mál nr. 15/01885, *Kollafjarðar Kirkjuráð: Umsókn um øki til nýggja kirkju í Kollafirði (2001-0678)*.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kortskjal j.nr. 23/02421-2, *Øki til býarmenning*
Skjal 23/02421-4, *Heildarætlan Kollafjørður jan 2003*
Skjal 23/02421-3, *Málslýsing_Uppskot til framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð j. nr. 200202500*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

Á núverandi støði hevur málið ikki fíggjarligar avleiðingar, men verður komið á mál við samráðingunum og farið verður undir at keypa lendi til býarmenning, so verður málið lagt fyri aftur.
Somuleiðis verður tá neyðugt við játtan til at býarmenna økini, sum tá eru fingin til vega.

**Tilmæli:**
Virkandi kommunustjórin, og býararkitekturin mæla til:

- at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festarar um økini við Sjógv smb. kortskjali nr. 23/02421-2,
- at um sámráðingarnar koma á mál, verður farið undir at gera heildarætlan fyri samlaða økið við Sjógv.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við festaran av Sjóvarhaganum í sambandi við ætlanir um at leggja øki burtur av festinum Sjóvarhaga undir byggisamtykt til bústaðarbygging og trivnaðarøki. Fyribils avtala er gjørd við festaran, sí skjal *Fyribils avtala millum Gunnvør D. Jensen og TK ísv. Sjóvarhaga – undirskrivað 19-12-2023.*

Sambært avtaluni skal Tórshavnar kommuna søkja Búnaðarstovuna um at keypa tey trý lendini víst á kortskjali *Uppskot um keyp av festijørð øki 123, dagfest 15.12.2023.*

Somuleiðis bindir Tórshavnar kommuna seg í avtaluni til at broyta byggisamtyktina fyri teir partarnar av matr. nr. 313a, sum í dag liggja sum D1-øki og D3-øki, og sum liggja vestan fyri øki 1 í kortskjalinum *Uppskot um keyp av festijørð øki 123, dagfest 15.12.2023* til landbúnað (4. grundumráði). Somuleiðis skal Tórshavnar kommuna endurrinda eitt seyðahús, ið festarin sambært avtaluni missir.

Avtalan staðfestir harumframt, at Tórshavnar kommuna og festarin í Sjóvarhaga binda seg til at tryggja, at eingin bygging skal fara fram innan fyri eitt millum partarnar nærri avtalað mark móti Botnánni, ið rennur framvið matr. nr. 313a, Kollafjørður og matr. nr. 107a, Kollafjørður. Tórshavnar kommuna skal somuleiðis so vítt gjørligt taka atlit til lagaða gamla bøgarðin, sum fylgir øki 1 frá landsvegnum niðan til ánna.

<u>Broyting av byggisamtykt:</u>
D3 økið, sum sambært avtaluni skal broytast til 4. grundumráði, er partur av øki, ið varð lagt sum D3 øki í ár 2007 í sambandi við ætlanir um at byggja kirkju í økinum. Ongar ítøkiligar ætlanir eru um, júst hvar í økinum kirkjan skal standa, og er málið viðv. staðseting av nýggjari kirkju í Kollafirði ikki komið víðari, síðani umsóknin varð latin kommununi. Mett verður, at hóast broytingin í byggisamtyktini verður framd, so eigur tað at vera møguligt at finna eina hóskandi staðseting til kirkjuna í økinum.

D1 øki, sum sambært avtaluni skal leggjast aftur sum 4. grundumráði, er sambært Jarðfeingi ein jarðfrøðilig leivd frá ístíðini, har tveir jøklar, ein úr Kollfjarðardali og ein fram við Botni møtast. Tilfar frá hesum jøklunum gera heyggjarnar, og sýna serliga náttúrufyribrigdið, ið kallast miðmorena. Morenan fortelur, hvussu nógv av lendinum hevur verið undir ísi. Sí skjal *Telefonnotat – Jarðfeingi.*

<u>Kunning um morenu:</u>

"*Når en gletsjer glider hen over underlaget, smelter det medslæbte materiale fri. Det knuses og presses sammen af isens tryk og bevægelse, så der efterhånden opbygges et jævnt lag, normalt 0,5-3 m tykt, af kompakt bundmorænemateriale, hvor aflange småsten generelt ligger orienteret parallelt med isens bevægelsesretning. Ved at måle deres orientering kan man fastlægge isens bevægelsesretning på steder, hvor den for længst er smeltet bort. Det resulterende bundmorænelandskab er fladt til jævnt bølget og med en frugtbar, leret jordbund."*
Kelda: moræne - Læs om dannelse og sammensætning - lex.dk

"Morena er leyst tilfar, sum ísur flytur við sær, tá ið hann fer yvir land. Tilfarið er sera blandað, bæði stór grótstykkir, fínari sandur, leirur og lívrunnið tilfar blandast saman. Hetta nevnist eisini till. "
Kelda: Ymisk fyribrigdi | Jarðfeingi (jf.fo)

Umsitingin hevur somuleiðis tosað við staðkendan kollfirðing ið fortelur, at helst hevur alt D1 og D3 økið, sum nú er velt, verið morenuheyggjar, og eru verandi morenuheyggjarnir í D1 økinum teir einastu, ið eru varðveittir.

Umsitingin metir, at hetta serliga økið eigur at verða varðveitt sum D1 øki, fyri at tryggja hesa jarðfrøðiligu leivdina, eisini í framtíðini. Í hesum sambandi hevur umsitingin tosað við festaran, ið sigur, at tað ikki er ein treyt frá festarans síðu, at D1 økið vestanfyri øki 1 verður lagt sum 4. grundumráði, men at ynski er at nýta økið til sama landbúnað, sum økið verður brúkt til í dag. Festarin tekur undir við, at økið verður varðveitt sum D1 øki.

Tískil verður mælt til, at parturin av avtaluni, ið snýr seg um at broyta D1 øki til 4. grundumráði, verður tikin úr.

Samlaðu ítøkiligu broytingarnar í byggisamtyktini síggjast í kortunum *Byggisamtykt – áðrenn broyting* og *Byggisamtykt – eftir broyting.*

<u>Heildarætlan fyri øki við Sjógv:</u>
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 8. mai 2023, at um sámráðingarnar við festaran koma á mál, verður farið undir at gera heildarætlan fyri samlaða økið við Sjógv.
Fyribils avtalan við festaran fevnir um tvey lutfalsliga stór øki, ið eiga at verða skipað.

Øki 3 oman fyri skúlan og ítróttarhøllina eigur at verða skipað við sethúsagrundstykkjum og møguliga øðrum bústaðarsløgum eisini. Endalig støðutakan til, hvussu møgulig atkoma til økið skal vera, eigur at verða nágreinað, eins og endalig skipan av økinum skal gerast.

Øki 1 og 2 sunnan fyri Botnánna er ein heilt nýggjur býlingur, har tað kann hugsast, at ymisk bústaðarsløg, miðstaðarbygging og møguliga eisini mentunarbygging, so sum kirkja o.a. verður staðsett. Somuleiðis treytar avtalan, at skipanin av økinum so vítt gjørligt tekur atlit til lagaða gamla bøgarðin, sum fylgir øki 1 frá landsvegnum niðan til ánna.

Mett verður, at neyðugt er við ráðgeving til hesar partar av arbeiðinum, og mælir umsitingin tískil til, at uppgávurnar at skipa økini verða lýstar og nágreinaðar, fyri síðani at bjóða ráðgevingina út til privatu ráðgevaravinnuna. Tá tilboðini upp á ráðgevingina fyriliggja, so verða hesi løgd aftur til politiska støðutakan.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- at taka partin av avtaluni, ið snýr seg um at broyta D1 økið vestan fyri øki 1, úr avtaluni, eins og lýst omanfyri, og annars samtykkja fyribils avtaluna "*Fyribils avtala millum Gunnvør D. Jensen og TK ísv. Sjóvarhaga – undirskrivað 19-12-2023*".

- at umsókn um at keypa lendi 1, 2 og 3 smb. avtaluni verður send Búnaðarstovuni, og at endaligi kostnaðurin fyri lendi og endurrindan av nýggjum seyðahúsi verður at leggja aftur til politiska støðutakan, tá kostnaðurin er ítøkiligur.
- at broyta byggisamtyktina smb. kortskjalinum *Byggisamtykt – eftir broyting.*
- at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið at gera heildarætlan/ir fyri øki 1, 2 og 3 út til privatu ráðgevaravinnuna, og at tilboðini verða løgd aftur til politiska støðutakan, tá hesi fyriliggja.
- at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

# 16/24 Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1 og øki 5.2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 13/24 | 23/06318-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 19/24 | 23/06318-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 16/24 | 23/06318-2 |

**Upprunin til málið**
Heildarætlan er gjørd fyri part av matr.nr. 256, Kirkjubøur oman fyri Argjahamar. 26. januar 2023 samtykti býráðið í mál nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging. Lendini, sum eru boðin út, eru

1. Øki 3 til bygging av raðhúsum og/ella íbúðum, sí øki 3 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2. Eitt tilboð er innkomið.
2. Øki 4 til bygging av vinnubygningi við íbúðum á ovaru hæddunum og felags parkering, sí øki 4 á eystaru síðu av linju 2. Eitt tilboð er innkomið.
3. ***Øki 5.1 til bygging av raðhúsum, sí øki 5.1 á tekning, bygging á eystaru síðu av linju 2 – 3 tilboð eru innkomin.***
4. ***Øki 5.2 til bygging av raðhúsum, sí øki 5.2 á tekning, bygging á eystaru síðu av linju 2 – eitt tilboð er innkomið.***
5. Øki 6.1 til bygging av íbúðarhúsum, sí øki 6.1 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2 – Einki tilboð innkomið og feistin er farin.
6. Øki 1 bleiv lutað út til sethúsagrundstykkir, sí øki 1 á tekning – bygging á eystaru síðu av linju 1.

Sí fylgiskjal 23/06318-*6 Yvirlitskort skipan útstykking oman fyri Argjahamar dagf16juni2023 og Fylgiskjal 23/06318-5 Útbjóðingartilfar øki 5.1 og Fylgiskjal 23/06318-7 Útbjóðingartilfar øki 5.2.*

**Lýsing av málinum**
Í septembur 2023 beyð Tórshavnar kommuna øki 5.1 og øki 5.2 út til bygging av raðhúsum. Tá freistin at lata tilboð inn tann 25. oktobur 2023, kl. 12, var farin, vóru trý tilboð innkomin til øki 5.1 og eitt alternativt tilboð upp á øki 5.2.

Tilboðini fyri øki 5.1 eru frá;

- Sp/f SH Ráðgeving 4.360.000 kr. pr. raðhúsaeind 10 raðhúsaeindir
- Sp/f Høgni Mikkelsen 3.995.000 kr. pr. raðhúsaeind 10 raðhúsaeindir
- Sp/f Jóan Petur Vang 3.900.000 kr. pr. raðhúsaeind 11 raðhúsaeindir

Alternativa tilboðið fyri øki 5.2 er frá;

- Sp/f Jóan Petur Vang

**<u>Øki 5.1</u>**
Sambært útbjóðingartilfarinum verður økið selt fyri ásettan, fastan, mettan prís áljóðandi;

**kr. 4.131.163.**

Umframt hetta var í útbjóðingartilfarinum sett treyt til, at tilboðsgevi lat inn;

- váttan frá peningastovni um tøka fígging til keyp av lendi
- tekningar og frágreiðingar av verkætlanini
- frágreiðing um toymi

Í útbjóðingartilfarinum verður upplýst, at innlatnu tilboðini verða mett út frá niðanfyri standandi punkum, í fylgjandi raðfylgju;

- Endarkostnaður fyri hvørja búeind
- Byggilist
- Skipanin av økinum í sambandi við nærumhvørvið
- Væntað tíðarætlan fyri arbeiðstøku

Umsitingin hevur gjøgnumgingið innlatna tilfarið, bæði innanhýsis og saman við øllum tilboðsveitarum, og hevur síðani endaliga mett um tilboðini, sí fylgiskjal 23/06318-4 metingarskjal sambært krøvum.pdf.

Innlatnu uppskotini/tilboðini eru rættiliga lík, tá hugsað verður um, hvat eindarkostnaðurin fyri eindirnar er mettur at gerast. Sniðini á raðhúsunum eru kend í føroyskum høpi, og hava mennararnir hvør í sínum lagi latið uppskot inn, sum teir áður hava roynt at byggja. Sí innlatnu uppskotini, journal nr. 23/06318-1.

Niðurstøðan hjá dómsnevndini var, at uppskotið frá sp/f Jóan Petur Vang var mest fullfíggjaða tilboðið/uppskotið, bæði tá hugsað verður um sniðið á raðhúsunum og uttanumøkið, umframt at upplýsti eindarkostnaðurin á raðhúsaeindini er lægstur.

**Uppskot hjá Sp/f Jóan Petur Vang**
Uppskotið hjá Sp/f Jóan Petur Vang er við Kontrast sum heildarráðgeva.

Innlatna tilfar teirra er fullfíggjað og lýsir væl skipanina av uttanumøkinum umframt tilfarsval og tankar handan byggilistina. Uttanumøkið kring bygningina er væl umhugsað og vendir rætt í mun til sólargang.

Raðhúsaeindirnar hava eina óintrættaða kjallarahædd og innrættaða stovu- og loftshædd. Eindirnar kunnu gerast í trimum sniðum;

A) Uppskot við 4 kømurum
B) Uppskot við 3 kømurum, størri stovu og køk
C) Uppskot við 3 kømurum, bryggers í framhald av køki

Miðhæddin er í øllum uppskotunum innrættað við duri, bæðirúmi, køki og stovu í einum, umframt trappu. Loftshæddin er í øllum uppskotunum innrættað við 3 kømurum, baðirúmi og einari loftsstovu, sum leiðir út á stóru suðurvendu terrassuna. Undir terassuni er ein carport. Kjallarahæddin hevur tøkni og vaskirúm, men er annars óinnrættað. Eisini hevur hvørt raðhús altan og garð framman fyri húsið í ein norðan oman móti barnagarðinum.

Talan er um modulbygging, har hvør hædd er 82 $m^2$, og hvørt raðhús er samanlagt 246 $m^2$ til støddar (íroknað óinnrættaða kjallarahædd).

Byggingin leggur seg í lendið, og hækkar við lendinum/vegnum, soleiðis at 2 og 3 hús standa saman. Byggingin hevur smáar forskjótingar í framsíðunum. Í innlatna uppskotinum verður víst á møguleikan við listaklæðing og at seta lit á fasaduna. Raðhúsabyggingin hevur mønutekju við einum halli á uml. 20 gradir. Tilboðsgevin er sinnaður at samstarva við kommununa um møguligar tillagingar í uppskotinum, so sum val av tilfari osfr.

Tilboðsveitari upplýsir, at arbeiðið kann byrja 1. apríl 2024, og miðað verður ímóti, at alt verður liðugt í 2026.

**<u>Eindarkostnaðurin:</u>**
Seinastu árini er bústaðarkostnaðurin hækkaður heilt nógv í Tórshavnar kommunu, og sýnist tað torført hjá vanligum fólki at seta búgv í kommununi.
Hetta útboðið er fyrsta royndin at bjóða eitt byggilendi út til mennarar at byggja, har eitt av krøvunum er at lata inn ein endarkostnað fyri bústaðareindirnar. Henda treyt varð roynd fyri at vita, um kommunan saman við einum tilboðsveitara kann byggja nakrar bústaðir við hámarkskostnaði.

Vinnandi tilboðið fevnir um bústaðareindir á 246 $m^2$, har eindarkostnaðurin er mettur til kr. 3.900.000 pr. bústaðareind. Hetta gevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 15.854.

Umsitingin metir, at um samtykt verður at selja øki 5.1 til sp/f Jóan Petur Vang, so eigur ein endalig samráðing at fara fram við tilboðsveitaran um at tryggja ein fastan eindarkostnað, sum báðir partar kunnu góðkenna, áðrenn endaligt skeyti verður skrivað.

**Søla av raðhúsunum:**
Áhugamálini hjá Tórshavnar kommunu eru at nøkta bústaðartørvin í kommununi, og harvið tryggja, at bústaðirnir koma borgarum, ið hava tørv á einum bústaði, til góðar. Hetta kann tryggjast við, at kommunan ávísir ein keyparaskara til tilboðsveitara, t.d. við at áhugaði skriva seg upp á ein lista, har kommunan setir treytir til, hvør kann skriva seg upp, og at kommunan eftirfylgjandi lutar raðhúsaeindirnar út millum tey áhugaðu.
Ein annar møguleiki er, at tilboðsveitarin stendur fyri allari sølu, og tá er truplari hjá kommununi at tryggja, at tað eru tey, sum veruliga hava ein bústaðartørv, sum sleppa framat at keypa. Tað økir um vandan fyri spekulatión.
Politisk avgerð skal tískil takast um, hvussu ein søla skal fara fram.

**Øki 5.2**
Saman við tilboðnum uppá øki 5.1. letur Sp/f Jóan Petur Vang eitt alternativt boð inn uppá øki 5.2, ið er økið lagt av til 16 raðhúsaeindir. Hetta var einasta tilboð, sum kom inn uppá økið 5.2.
Sambært útbjóðingartilfarinum, verður økið selt fyri fast mettan prís áljóðandi;

**9.208.363 kr.**

Alternativa uppskotið er soljóðandi, sí somuleiðis s. 30 í uppskotinum frá JPV og Kontrast, journal nr. 23/06318-1:
"Tilboðsgevi bjóðar sama prís fyri hvørt grundstykki á øki 5.2 sum á 5.1. Tvs. at keypari ynskir at bjóða 375.560,30 kr/raðhús x 16 raðhús =

**6.008.964,80 kr uppá økið 5.2**"

Tilboðsgevi meinar, at eitt fríøki á 2373 $m^2$, sum eru krøvini á øki 5,2, er ov nógv í mun til tað, sum man kann byggja á. Av tí sama ynskir hann ein lægri fermetrakostnað.
Annars ynskir tilboðsgevi at brúka sama skitsuuppskot uppá økið 5.2 sum á 5.1, men at treytir við túnagøtu og grøna økið skal samskipast við kommununa.

Á fundi við tilboðsgeva tann 3. januar 2024, bleiv gjørt greitt, at tað ikki er møguligt at broyta prísin fyri lendið. Prísurin avhongur av, hvat tað kostar at gera samlaðu útstykkingina.

Raðhúsaeindirnar á økið 5.2. koma at kosta 575.510,20 kr, sum er 199.949,90 kr. meiri enn fyri raðhúsaeindina á økið 5.1. Í hesum sambandi bleiv umrøtt, um tað kundi verið ein møguleiki at býtt munin millum raðhúsaeindirnar á øki 5.1. og 5.2. og somuleiðis hækka fasta søluprísin pr. raðhúsaeind eitt sindur.

Umsitingin metir, at av tí at tilboðið er alternativt, og sølukostnaðurin er fastur, so eigur ein verulig samráðing at fara fram við tilboðsveitaran fyri at náa fram til eina sølu av stykkinum, soleiðis at somu tættir verða galdandi fyri bústaðarbyggingina.
Tískil verður mælt til at selja sp/f Jóan Petur Vang øki 5.2, treytað av at samráðingarnar koma á mál, har sølukostnaðurin heldur og tilboðsveitarin kann veita ein fastan nøktandi eindarkostnað fyri bústaðareindirnar.

Viðmerkjast skal, at alternativa uppskotið uppá øki 5.2 ikki telur við í niðurstøðuni hjá dómsnevndini uppá øki 5.1, men at uppskotini hava verið mett út frá hvør sínum fortreytum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr 256 liggur í umráðisparti A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt. Uppskot til serstaka byggisamtykt liggur til hoyringar fram til 7. februar. Ásetingarnar fyr i øki 5.1. eru soljóðandi:

1. Øki E verður lagt til raðhúsabygging.
2. Raðhúsastykkir skulu vera í minsta lagi 200 m$^2$.
3. Byggingin skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin. Heildarætlanir skulu gerast fyri hvønn økispart sær. Góðkendar heildarætlanir verða lagdar sum fylgiskjal til serstøku byggisamtyktina.
4. Mest loyvda byggistig er 0,35.
5. Mest loyvda nýtslustig er 1,05.
6. Byggjast kunnu í mesta lagi 3 hæddir og byggingin skal hava mønutekju, sum er javnfjarð við vegin. Niðasta hædd skal vera undir veghædd.
7. Mest loyvda hædd er 9 m til hægsta punkt við útvegg og 10,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.
8. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/06318-1 spf RH Ráðgeving
23/06318-1 Høgni Mikkelsen
23/06318-1 Kontrast og JPV
23/06318-4 Metingarskjal sambært krøvum
23/06318-6 Yvirlitskort skipan útstykking oman fyri Argjahamar dagf16juni2023
23/06318-5 Útbjóðingartilfar øki 5.1.
23/06318-7 Útbjóðingartilfar øki 5.2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Søla av lendi

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: |
|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. januar 2024 | Blað nr.: 66 | Formansins merki: |

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | |
| 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | |

| Upphædd |
|---|
| 4.131.163 |
| 9.208.363 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 13.339.526 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Hetta málið er partur av útstykkingarverkætlanini oman fyri Argjahamar. Um endaligu samráðingarnar koma á mál við tilboðsgeva, so skal sølu-upphæddin flytast á L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at selja og sundurbýta økið 5.1 til tilboðsgevara, Sp/f Jóan Petur Vang, tá endaligu samráðingarnar við tilboðsgevara eru komnar á mál.
- at selja og sundurbýta øki 5.2 til tilboðsgeva, Sp/f Jóan Petur Vang, treytað av at samráðingarnar við tilboðsgeva koma á mál.
- at Tórshavnar kommuna stendur fyri at savna ein keyparaskara og lutar raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggjar tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

# 17/24 Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 25/22 | 22/00329-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 40/22 | 22/00329-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 112/23 | 22/00329-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 159/23 | 22/00329-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 135/23 | 22/00329-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 153/23 | 22/00329-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 269/23 | 22/00329-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 247/23 | 22/00329-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 19/24 | 22/00329-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 5/24 | 22/00329-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 20/24 | 22/00329-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 17/24 | 22/00329-1 |
| 14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 08.02.2024 | 2/24 | 22/00329-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna er í troti av bústøðum. Í heyst varð farið undir at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 51a á Velbastað, sí viðhefta skjal 22/00329-2, Økið_broytt til bústaðarbygging.

Broytingin er grundað á ynski um at gera eina kommunala sethúsaútstykking í økinum.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin fór í heyst undir at broyta ein part av matr. nr. 51a til økisásetingina B – Bústaðarøkið. Broytingin er enn ikki endaliga góðkend í Býarskipanarnevnd Landsins, men verður viðgjørd í nevndini fyrst í februar.

Fyri at fara undir at gera útstykkingina, er neyðugt, at kommunan ognar sær lendið, sum ætlanin er at byggja á. Harumframt skal verkætlanin projekterast og setast í verk.

Umsitingin sær fyri sær, at økið verður boðið út til arbeiðstakara at menna og byggja, og í tí sambandinum er neyðugt at fara undir at gera útbjóðingartilfarið, sum skal liggja til grund fyri verkætlanini. Kommunan ynskir at bjóða lendið út til projektering og bygging av grundstykkjum, sum kommunan síðani lutar út til privat til bygging av sethúsum.

Økið, sum talan er um at keypa, er uml. 8500 $m^2$ til støddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018
- Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
- Reglugerð fyri útlutan av fastari ogn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sum eisini sæst í málinum um broyting av byggisamtyktini, so ynskir staðbundna nevndin at síggja útstykkingarætlanina, tá hon er liðug. Tískil verður mælt til, at umsitingin setir seg í samband við limir í nevndini í sambandi við gerð av útbjóðingartilfarinum, og eigur verkætlanin at verða løgd fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru innkomin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01258 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað fyri part av matr.nr. 51a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00329-2 Økið_broytt til bústaðarbygging

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | x | x | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar fyri verkætlanina og at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum, partur av matr. nr. 51a, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og heimila umstingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til verkætlanina og fyrireika útbjóðing og harumframt at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, tá hesi viðurskifti eru avgreidd.

**Ískoyti**
Tá freistin at lata tilboð inn tann 13. mars kl. 12 var farin, vóru tvey tilboð innkomin.

| | | |
|---|---|---|
| P/F Tórhall Hansen á | kr. 6.037.839 u/mvg fyri | 17 grundstykki |
| Sp/f Plan á | kr. 11.191.071,05 u/mvg fyri | 14 grundstykki |

Útboðið var skipað á tann hátt, at tilboðsgevari gav tilboð upp á:
• Skipanaruppskot fyri økið
• Projektering íroknað myndugleikaviðgerð
• Byggibúning

Síðani er ætlanin, at kommunan lutar stykkini út til privatpersónar at byggja síni sethús á.

Í útbjóðingartilfarinum stóð, at tilboðsgevari vinnur upp á bíligasta kostnað. Sambært hesum hevur P/F Tórhall Hansen vunnið útboðið.
P/F Tórhall hansen hevur havt Sp/f Uni Patursson afturat sær sum ráðgevandi verkfrøðing.

Byggimálsdeildin og býarskipanardeildin fóru saman við vinnandi tilboðsgevaranum, P/F Tórhalli Hansen, í eina samráðingartilgongd at finna fram til mest skynsomu gagnnýtsluna av økinum í mun til kostnaðin.

Í hesi tilgongdini varð m.a. komið fram til, at stykkini í skipanaruppskotinum vóru teknað ov trong og avmarkandi til eina vanliga familju at innrætta seg á.
Eitt nú fór tað at gerast trupult at rúma einum bilhúsi á hvørjum av stykkjunum, ið var mett at hava stóran týdning, og tilboðsgevarin var tískil biðin um at tillaga ætlanina nakað. Úrslitið var, at tey 17, heldur trongligu stykkini, vórðu umskipað til 14 rúmligari grundstykkir.

Tilboðsgevarin lat so statt eitt tillagað uppskot inn 15. mai 2023 við nýggjari kostnaðarmeting fyri projektering og byggibúning av samlaðu útstykkingini av 14 grundstykkjum (á umleið 500m² hvørt), ið var tilsamans áljóðandi: <u>6.995.579 kr u.mvg.</u>

Sí viðhefta skipanaruppskot og arbeiðstøkutilboð: *Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21

Í sambandi við at fyrireika økið við tilføringurm, reinsiverki, drenskipan o.a. hevur Tekniska deild eisini gjørt eina kostnaðarmeting fyri «avleiddar verkætlanir». Hon er soljóðandi (u.mvg):

| | | |
|---|---|---|
| Dren av yvirflatuvatni omanfyri útstykkingina: | kr | 312.000 |
| Gøtuljós og íbinding: | kr | 250.000 |
| Reinsiverk við neyðugum leiðingum: | kr | 400.000 |
| Kloakkleiðingar: | kr | 250.000 |
| Vatnleiðing: | kr | 50.000 |
| Brandpostar: | kr | 60.000 |
| | | |
| <u>Tilsamans (u.mvg)</u> | <u>kr</u> | <u>1.322.000</u> |

Leggjast skal afturat, at í einum slíkum føri heftir SEV fyri kostnaðin, sum stendst av at tryggja neyðugu el-leiðingarnar til eina nýggja útstykking sum hesa. Í hesum sambandi nevnir SEV fleiri møguleikar í økinum, har knýtast kann í verandi el-kervið á Velbastað.

Skrivlig tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni um keypið av lendinum, sum Føroya jarðargrunnur eigur.
Metti kostnaðurin fyri lendið á matr. nr. 51a á Velbastað (uml 8.500m² av dyrkingarbærum lendi í Øki 2 Velbastaður) er: kr. 1.050.000.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er tískil:

| | | |
|---|---|---|
| Projektering og byggibúning: | kr | 6.995.579 |
| Avleiddar tekniskar verkætlanir: | kr | 1.322.000 |
| Keyp av lendi: | kr | 1.050.000 |

Tilsamans: kr 9.367.579

Íroknað kommunalt mvg á 6,25% er hetta: kr 9.953.053

Metti eindarkostnaðurin fyri hvørt grundstykki (á uml. 500m²)
verður tískil: (9.953.053 / 14): kr 710.932

Sí annars viðheftu útgreinaðu kostnaðarmetingina fyri samlaðu verkætlanina:
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j.nr. 22/00329-23. *Afturat kostnaðarmetingini verður mælt til at seta 1 mió. kr av til ókent. Alt eftir hvussu nógv verður brúkt av ókendu puljuni, so kann hetta ávirka endaliga eindarkostnaðin fyri hvørt grundstykki.*

Um umsitingini verður heimilað at halda fram við verkætlanini, og samráðingararbeiðið við tilboðsveitaran kann halda fram, er hugsandi, at smærri tillagingar eiga at verða gjørdar í skipanaruppskotinum, eitt nú í mun til hvussu økið til bilparkering framman fyri útstykkingini eisini tryggjar, at koyribreytin á Ervavegnum (sum er atkomuvegurin niðanfyri útstykkingina) kann breiðkast nakað niðan ímóti grundstykkjunum. Hendan koyribreytin er heldur smøl í dag.

P/F Tórhall Hansen metir, at verkætlanin verður liðugt projekterað í summar. Og um øll neyðug loyvi vera givin í næstum at stykkja út, so kann útstykkingin standa liðug um 1,5 ár eftir, at arbeiðstøkan byrjar.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6475 | | Byggibúning bústaðir | 6475 | | | Nýggj útstykking á Velbastað | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini kannar um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimilað umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen

- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí kunning í ískoytinum omanfyri, har greitt verður frá ætlanini um at gera eina útstykking við 14 byggibúnum grundøkjum (á uml. 500 fermetrar hvørt), til sethús á Velbastað.

Málið varð tikið av skrá, orsakað av at tilsøgnin frá Búnaðarstovuni fyrilá ikki sum endaliga skjalfest í málinum.

Fyribils tilsøgn um keyp av lendi er nú fingin frá Búnaðarstovuni, sí viðheft skjal: *Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

Sum nevnt var í ísoytinum omanfyri, er metti eindarkostnaðurin fyri hvørt av teimum grundstykkjunum uml. Kr 710.932.

Gevið gætur, at hetta er ein mettur kostnaður, og at fyrivarni skal takast fyri óvissum ella smærri tillagingum í prosjekteringini, sum skal gerast av arbeiðstakaranum í næstum. Hetta hevur væntandi við sær, at endaligi eindarkostnaðurin verður justeraður nakað.

**Skjøl**
*Útstykkking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23
*Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at fáa heimild at selja stykkini.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.

at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí ískoyti til byggi- og býarskipanarnevndina 19. juni 2023 og 11. september 2023

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen
- at játtaðar verða kr. 11 mió. til verkætlanina sum eykajáttan av konto 6475, Byggibúning bústaðir, og at nýggj verkætlan við heitinum Nýggj útstykking á Velbastað verður upprættað á konto 6475 til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
18. oktober 2023 samtykti býráðið at umsitingin skuldi kanna, um áhugi er millum borgarar at keypa ætlaðu grundstykkini á Velbastað.

22. november var lýst alment, at fólk kunnu melda til lutakast um grundstykkini á Velbastað til 20. december 2023, og sagt varð frá: *Vísir áhugin seg at vera nóg stórur, verður verkætlanin løgd fyri nevndir og býráð til góðkenningar, og tilmeldingarfreistin verður longd í 4 vikur. Vísir tað seg hinvegin, at áhugin er lítil ella eingin, verður verkætlanin endurmett og møguliga broytt ella slept.*

Tá freistin var farin, vóru tað 8, ið høvdu meldað til lutakast og latið inn váttan um fígging.

Úrslitið skal sjálvandi takast við tí fyrivarni, at royndirnar vísa, at av teimum, sum vanliga melda til lutakast um grundstykki, eru tað altíð ein rímiliga stórur partur, ið fellur frá, og í hesum føri er ongin verkætlan enn, so tað skal nokk ikki leggjast meira í úrslitið enn tað, tað er. Altso meira ein kanning av áhuga enn ein tilmelding.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |

| **Upphædd** |
|---|

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Velbastað | Nýggj verkætlan | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024-25 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, grundað á at áhugin fyri útstykkingini er so stórur sum lýst omanfyri:

- at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at málið viðv. fíggingini sum eykajáttanarmál verður beint í býráðið til aðru viðgerð.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og játta 11 mió. kr. sum eykajáttan á konto 6475, Nýggj útstykking á Velbastað.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegingur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Annfinn Brekkstein fór av fundi.

# 18/24 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 34/21 | 20/03903-8 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 200/23 | 20/03903-8 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 10/24 | 20/03903-8 |
| 4 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 18/24 | 20/03903-8 |

**Upprunin til málið**
BRIM arkitektar søkja vegna kirkjuráðið fyri Arga Kirkju um loyvi til at byggja nýggja kirkju á matr. nr. 115, Støðlagøtu á Argjum.

**Lýsing av málinum**
Økið, har kirkjan skal staðsetast, liggur millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri spinnaríið.
Kirkjan er staðsett ovarlaga á stykkinum við parkeringsplássi vestanfyri og tí órørda klettalendinum eystanfyri. Staðsetingin er gjørd við atliti til sermerkta umhvørvið og vegurlagið í økinum. Lendið eystan fyri kirkjuna verður varðveitt í verandi líki í so stóran mun sum gjørligt.
Sambært skipanaruppskotinum er kirkjan 1257 $m^2$ til víddar, tornið er 22 metur høgt og har kirkjuskipið er hægst, er tað 15 metur høgt. Sambært serstøku byggisamtyktini er tað ikki hæddaravmarkingar til kirkjuna ella tornið.
Tornið og kirkjutorgið eru staðsett á feltunum nevnd “P-Pláss” / “Innkoyring”. Sambært serstøku byggisamtyktini fyri øki til kirkju á Argjum, § 4. skal økið skipast sambært tekning nr. 3, stk. 1. ið vísir at kirkjubygningurin skal staðsetast á feltinum “byggifelt og kirkjutorg”.
Sambært skipanar uppskotinum er pláss til 30 parkeringspláss inni á stykkinum og sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu KAP III, §3, stk. 3, b) er kravið at tað skal verða 50 parkeringspláss íalt, víst verður til at nógv kommunal parkeringspláss eru nærhendis kirkjuni. 20 pláss á ovaru síðu av Støðlagøtu, 15 pláss við gamla spinnaríið, 18 pláss í Garðsgøtu og 17 pláss í Heygstúni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstøk byggisamtykt fyri øki til kirkju á Argjum.
D1 í 3. grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
- Grundøkið, matr. nr.115, Argir, er 4110 $m^2$ til víddar.
- Bygging í D1-økinum er einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.
- Friðingarmyndugleikarnir hava góðkent ætlanina at leggja kirkju á økinum eftir Løgtingslóg nr. 48 um náttúrufriðing, §2, stk. 2. nr. 3.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)** Projekttilfarið er blivið sent til Náttúrufriðingarnevndina fyri Streymoyar Sýslu v/ Finnbogi Midjord, har kommunan biður um at fáa góðkenning av verkætlanini

**Skjøl**
20/03903-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva byggingini av nýggjari kirkju á Argjum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Smáar broytingar viðvíkjandi “Lýsing av málinum”**
Økið, har kirkjan skal staðsetast, liggur millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri spinnaríið.
Kirkjan er staðsett ovarlaga á stykkinum við parkeringsplássi vestanfyri og tí órørda klettalendinum eystanfyri. Staðsetingin er gjørd við atliti til sermerkta umhvørvið og veðurlagið í økinum. Lendið eystan fyri kirkjuna verður varðveitt í verandi líki í so stóran mun sum gjørligt.

Sambært skipanaruppskotinum er kirkjan 1257 $m^2$ til víddar, tornið er 20 metur høgt, og har kirkjuskipið er hægst, er tað 15 metur høgt. Sambært serstøku byggisamtyktini eru tað ikki hæddaravmarkingar til kirkjuna ella tornið.

Tornið og kirkjutorgið eru staðsett á feltunum nevnd “P-Pláss” / “Innkoyring”. Sambært serstøku byggisamtyktini fyri øki til kirkju á Argjum, § 4. skal økið skipast sambært tekning nr. 3, stk. 1, ið vísir, at kirkjubygningurin skal staðsetast á feltinum “byggifelt og kirkjutorg”.

Sambært skipanaruppskotinum er pláss til 24 parkeringspláss, harav 3 til rørslutarnað, inni á stykkinum, Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu KAP III, § 3, stk. 3, b) er kravið, at tað skulu vera 50 parkeringspláss íalt. Víst verður til, at nógv kommunal parkeringspláss eru nærhendis kirkjuni, 20 pláss í ovaru síðu á Støðlagøtu, 15 pláss við gamla spinnaríið, 18 pláss í Garðsgøtu og 17 pláss í Heygstúni.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Yvirfriðingarnevndin tekur ikki málið um kirkjubyggingina á Argjum uppaftur. Avgerðin hjá nevndini tann 26. oktober 2021 verður tí standandi. Avgerðin er ikki at friða økið við Sandá.

**Skjøl**
20/03903-20: Serstøk byggisamtykt fyri øki til Kirkju á Argjum
20/03903-23: Forprosjekt – Teknings- og skjalayvirlit.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva byggingini av nýggjari kirkju á Argjum við treytum, sum umsitingin setir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Útsett til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Jákup Dam og Súsanna Olsen, samtykti at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, mælir til at útskriva byggiloyvi.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

# 19/24 Endurskoðan av vegamótinum Løgmannabreyt / Vegurin Langi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.01.2024 | 1/24 | 23/07386-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.01.2024 | 4/24 | 23/07386-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 19/24 | 23/07386-1 |

**Upprunin til málið**
Eigarafeløgini í Hoyvík, seks í tali, hava vent sær til kommununa, við undirskriftum og frágreiðing um, hvussu tey uppliva ótolandi ferðsluviðurskiftini við vegamótið Vegurin Langi / Løgmannabreyt (frágreiðingin er viðheft)

**Lýsing av málinum**
Hoyvík er ein stórur partur av Tórshavnar kommunu, fólkavøksturin er øktur sera nógv tey síðstu árini, og tann mest natúrliga leiðin oman í býin er gjøgnum Løgmannabreyt og út á Vegin Langa. Í meldurtíð á morgni og seinrapart er sera trongligt og ruðuleikakent við vegamótið. Í roynd og veru má okkurt gerast við nevnda trupulleika.

Hvørjir møguleikar eru so at taka til:
**Rundkoyring:** Allir vegir, Løgmannabreyt, Vegurin Langi og Kirkjustræti verða bundnir í.
Fyrimunir: Ongin ferðsluljós, allir vegir verða knýttir í eina rundkoyring.
Vansar: Er minni góð til meldurtíðarferðslu, er kostnaðarmikil.
Fyribils meting 8 mió. Kr. u/MVG.
**Ferðsluljós:** Vegakervið verður stórt sæð sum tað er nú.
Fyrimunir: Smávegis broytingar á vegakervinum, minni kostnaðarmikil.
Vansar: Ferðsluljós at røkta, avbjóðing við ferðsluni frá Kirkjustræti.
Fyribils meting 4 mió. Kr. u/MVG.

Áðrenn avgerð verður tikin um, hvør loysn skal veljast at arbeiða víðari við, skal sjálvandi eitt forarbeiðið gerast, sum m.a. fevnir um kanningar og simulering.
Til hetta forarbeiðið skal brúkast 300.000 kr. u/MVG.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/07386-4 Skriv við undirskriftum frá eigaraf.PDF
23/07386-3 Ljóskurvar.pdf
23/07386-2 Rundkoyring.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| Býráðsfundur<br>25. januar 2024 | Blað nr.: 78 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vega-verkætlanir | 8175 | | | Endurskoðan av vegamótinum Løgmanna-breyt/Vegurin Langi | 350.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at arbeiða víðari við verkætlanini.
- at játtaðar verða kr. 350.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81999, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Endurskoðan av vegamótinum Løgmannabreyt / Vegurin Langi"
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 17:15</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Jákup Dam | Gunvør Balle | Annika Olsen |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen | Jón Kragesteen |
| | Birita Baldvinsdóttir Iversen | |